| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**28. juni 2012** | Blað nr.:<br>**9825** |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **28. juni 2012** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 159/12-206/12**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Jákup Símun Simonsen
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Levi Mørk
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria H. Olsen, ið var uttanlanda

**LUTTÓKU EISINI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**165/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 28. juni 2012:** Tikið til eftirtektar.

**166/12** **2012-0664**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 2. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 31. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 28. juni 2012:** Framlagt og góðkent.

**167/12** **2008-0257/19 TK-P**

**Nevndarviðgerð: Glyvursvegur 5. byggistig – Eykajáttan í sambandi við goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi til avgrevstur og broyting av vegaskráum í ovara borð**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j. nr. 2007-2302 : Nevndarviðgerð: Glyvursvegur 5. byggistig – Útbjóðing Arbeiðstøka.

Í sambandi við grevstrararbeiði av 5. stigi av Glyvurvegi er tað staðfest, at tilfarið, ið ætlanin er at nýta til ífyllu v.m., ikki kann nýtast til vegarbeiðið. Heldur ikki ber til at fáa tilfarið flutt á lendið hjá bóndanum, tí tað er so vánaligt. Neyðugt hevur tí verið at flutt tað út í grótbrotið á Glyvursnesi, har ætlaða tyrvingarplássið skal gerast.

Umsitingin fekk øll neyðug loyvir til vega at leggja yvirskotstilfar til bóndan Poul Müller í sambandi við grevsturin, hetta fyri at sleppa frá at koyra tilfarið niðan í Húsahagan. Meiningin var at fáa økið hjá bóndanum til slótturbø.

Nú arbeiðið er byrjað av álvara, vísir tað seg, at tilfarið gjøgnumgangandi er sera vánaligt. Kanningar á starvsstovu og hjá Landsverk vísa, at tilfarið er óegnað til at nakað kann vaksa í tí. Bóndin hevur sýtt fyri at taka ímóti tilfarinum. Tó er nakað av tilfari uttan svørð lagt á goymslu í grótbrotinum til skráar, men her má annað tilfar blandast uppí, fyri at tað kann brúkast sum rájørð. Mold er so at siga ongin á økinum. Her má finnast ein onnur loysn og mold fáast til vega aðrastaðni frá.

Vegaøkið og alt Glyvursnes er ridluskriðaøki og ikki er loyvt at koyra nakað tilfar yvir um Sandá. Hetta hevur ført við sær, at umsitingin hevur verið noydd at troyta aðrar møguleikar í sambandi við yvirskotstilfar.

Grótbrotið á Glyvursnesi er einasta loysnin sum er. Tvey økir eru nýtt sum fyribilslagur, tað er økið A og B. Tað triðja økið C verður brúkt til endaliga

goymslu. A og B liggja sunnanvert í grótbrotinum og C liggur norðanvert niðan ímóti beninum. Økið C er umleið 6.000 m², 100 m langt og 60 m breitt. Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til avtalu við Búnaðarstovuna og bóndan um økini.

Loysn A:
Fyri at kunna nýta økið C, er verandi vegur niðan á benið hampaður, ein vegur er gjørdur fram við beninum og eitt tippi er fyrireikað. Lastbilar koyra frá vegagerðini "Glyvursvegur 5. byggistig" og út til økið C. Fylt verður síðani í tveir sokallaðar Grísar, og koyrt verður niðan á benið og vippa út av tippinum. Benið er umleið 20 m høgt. Á henda hátt ber til at fáa eina goymslu, sum tekur umleið 70.000 m³ lm.

Loysn B:
Arbeitt hevur eisini verið við at kanna møguleikan at leggja tilfarið upp í rúgvu niðri á sløttum, men henda loysnin ber ikki til í veruleikanum. Tilfarið er ikki til at koyra á við tungum maskinum, og ikki ber til at fylla hægri enn 3 m. Loysn B er tískil vrakað.

Økonomisk viðurskiftir:
Tá ikki ber til at koyra tilfar til bóndan sum ætlað í útbjóðingartilfarinum, inniber hetta fylgjandi:

1. Strekkið verður longri. Tað er frá bóndanum Poul Muller og út í grótbrotið á Glyvursnesi. Víst verður til avtaluseðil nr. 1 millum Articon P/f og Tórshavnar kommunu. Meirkostnaður kr. 300.000,-.
2. Loysn A hevur eina meirútreiðslu tilskilað niðanfyri:
   a. Planering av vegi niðan á benið – planerað verður við 0-50 og trumlað. Longd 120 m. Kostnaður kr. 160.000,-.
   b. Gerð av vegi fram við beninum uml. 80 m. Kostnaður kr. 120.000,-.
   c. Gerð av rampu og stoppklássa uppi á beninum. Kostnaður kr. 45.000,-.
   d. Lessing frá fyribilsgoymslu 8 kr/m³ lm, koyring við Grísum 12 kr/m³ og dosing 5 kr/ m³ lm, tvs. 25 kr/ m³ lm at fáa tilfarið frá fyribils goymslu og niðan í økið C. Um vit rokna við 70.000 m³ lm gevur hetta kr. 1.750.000,-.
   e. Ein verjugarður av gróti verður gjørdur um neyðugt niðri í brotinum fyri at halda tilfarið innan fyri økið C. Hetta kostar kr. 275.000,- uttan veiting av gróti. Ætlanin er at fáa grót til vega frá Tórshavnar Havn, sum liggur í brotinum. Veiting av gróti er mett til kr. 200.000,-.
3. Samlað meirveiting er mett til kr. 3.000.000,- v/mvg.

Víst verður til avtaluseðil nr. 9 millum Articon P/f og Tórshavnar kommunu.

Kunning til TN um vegakráar í ovara borð:
Neyðugt verður eisini at leggja skráan niður í ovara borð á "Glyvursvegur 5. byggistig. Hetta inniber ein meirkostnað. Ein kann samanlíkna støðuna við vegarbeiðið "Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt".

Umsitingin hevur latið gjørt supplerandi kanningar til gjørdar graviroyndir á økinum við Georadara. Nýggir tvørskurðir verða í løtuni gørdir út frá viðurskiftunum á staðnum. Endaligu meirnøgdirnar eru ikki tøkar enn.
Eisini má tilfar til skráar sum rájørð fáast til vega aðrastaðni frá til at blanda uppí tilfar frá staðnum, sum er á goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi. Eisini má mold fáast til vega til skráarnar.
Talan verður eisini talan um minniveiting tí t.d. verður onki tilfar koyrt niðan í Húsahagan.
Ein endalig uppgerð verður gjørd, og málið um skráar og eyka játtan til hetta arbeiðið verður lagt fyri nevndina aftur skjótast.
Roknað er við 10% til ókent í samlaðu kostnaðarmetingini fyri alt vegaarbeiðið. Tað er umleið kr. 2.000.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta kr. 2.000.000,- í sambandi við meirkostnað í sambandi við at sleppa av vit yvirskotstilfar.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina við áheitan um at fíggja meirkostnaðin av verkætlanini fyri kloakkleiðingina frá útstykkingini undir Kongavarða (j. nr. 2007-0292).

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá støðuni í málinum um 5. stig.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til meirveitingar í sambandi við innanhýsis frágreiðing um fíggjarligu viðurskiftini frá tekniska stjóranum og um niðurstøðuna frá bygginevndini um ikki at koma við tilmæli til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Einar Brimnes var ikki til staðar undir viðgerðini.

Tekniski stjórin greiddi frá innanhýsis statusfrágreiðingini frá 2. febr. 2009, um 5. og 6. byggistig.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka spariuppskotini til eftirtektar, og at mæla

býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 20,4 mió. afturat til 5. og 6. byggistig.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir seg ikki kunna taka støðu til málið enn, av tí at hann fekk tilfarið í málinum sama dag, sum fundurin varð hildin.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki á fundinum, meðan nevndin viðgjørdi bygginevndina.

Ein meiriluti átalar harðliga handfaringina hjá bygginevnd og umsiting í málinum. Somuleiðis tekur nevndin, ikki undir við, at bygginevndin ikki vil geva nevndini tilmæli í málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Mál nr. 2008-0257 og 2008-1295 vóru viðgjørd undir einum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd.

Eisini samtykt at seta í verk óvilduga kanning fyri at staðfesta ábyrgd í hesum málum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

- Kunnað verður um gongdina í málinum á 5. og 6. byggistigi.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Málið um endaligan byggiroknskap fyri Glyvursveg 5. stig hevur verið til viðgerðar í bygginevndini 9. mars 2012. Tilmælið frá bygginevndini verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini (Sí j.nr. 2007-1283/18).

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Útsett.

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin hava havt fundir við SEV og FT-Net, at kanna um møguleikar vóru fyri at gera semju millum partarnar.

Úrslitið av fundunum var, at SEV og FT-Net eru sinnaðir at gera semju við kommununa um at rinda helvtina av kravi kommununar.

Kommunan kravdi upprunaliga kr. 1.001.129,- frá SEV og kr. 645.443,- frá FT-Net. Umsitingin greiðir frá uppskotinum til semjur. Víst verður til skjal nr. 2008-1295/17.

Við hesum uppskotum til semju gerst samlaða úrslitið av byggiroknskapunum fyri bæði byggistigini fylgjandi:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Glyvursvegur 5. Byggistig: hall á | kr. | -615.485,- | |
| Glyvursgevur 6. Byggistig: avlop á | kr. | 178.782,- | |
| Nettoúrslit: hall á | kr. | 463.997,- | v. mvg |

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið til semju. Víst verður til frásøgn nr. 11 frá fundi í bygginevndini, j. nr. 2007-1283/19.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir nevndini til at taka undir við uppskoti til semju við SEV og FT-Net um helvtarbýti, galdandi fyri Glyvursvegur 5. byggistig (j. nr. 2008-0257) og Glyvursvegur 6. byggistig (j. nr. 2008-1295), og, um avgjørt verður at taka undir við semjuni, at beina málið um fígging í hesum sambandi, í býráðið um fíggjarnevndina, við tilmæli um hvussu hallið skal fíggjast.

**Tilmæli frá umsitingini:**
Vísandi til tilmæli frá bygginevndini, um at gera semju við SEV og FT-Net, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at fíggja írestandi upphædd álj. kr. 463.997,- fyri 5. og 6. stig av Glyvursvegi,- av íløgum fyri vegir 2012, §6, kto. 8175.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 28. juni 2012:** Samtykt uttan atvkvøðugreiðslu.

**168/12** **2008-1295/23 TK-P**

**Glyvursvegur 6. byggistig: Fyrispurningur frá Articon P/f um at leingja verandi sáttmálan fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata Glyvursvegur 6. byggistig**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 2007-1458 - Dispositiónsuppskot: Nevndarviðgerð - Glyvursvegur 6. byggistig.

P/F Articon hava sett fram fyrispurning, um Tórshavnar kommuna er áhuga í at leingja verandi sáttmála fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata part av Glyvursvegur 6. byggistig. Tað er frá arbeiðstøkumarki fyri Glyvursveg 5. byggistig og suður um útstykkingina á Hamrinum á Argjum. Somu einleikaprísir verða nýttir sum í verandi projekti.

Verður fyrispurningurin gingin á møti, kemur hetta at spara kommununi eitt sindur av tíð.

Articon P/f ger spreingi- og planeringsarbeiðið í sambandi við nýggja skúlan á Hamrinum á Argjum.

Nú grevstrararbeiðið í sambandi við Glyvursveg 5. byggistig er um at vera liðugt, er møguleiki hjá Articon P/f at halda fram við Glyvursvegur 6. byggistig við tað sama. Eisini er munandi lættari at planleggja arbeiðini, tá tað er sami arbeiðstakari. Her verður eisini hugsað um grótjavnvág. Meiningin er eisini at nýta grót frá skúlanum á Argjum til vegaføringarnar.

Fyritreytirnar viðvíkjandi eigaraviðurskiftunum við Búnaðarstovuna mugu fáast í rættlag, áðrenn farið verður undir arbeiðið.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur í løtuni einki detailprojekt av 6. stigi, og tí er trupult at meta um samlaða kostnaðin fyri verkætlanini. Leystliga mett kemur arbeiðið at kosta uml. 10-12 mió. kr. Strekkið, talan er um, er uml. 450 m.

Onki avsett á fíggjarætlanini fyri 2008 til 6. byggistig, men hinvegin eru avsettar kr. 7,5 mió. til prosjektering av brúgv um Sandá, sum er Glyvursvegur 4. stig. Tað verður tó ikki komið so langt við hesum arbeiði í 2008 sum upprunaliga ætlað. Sama ger seg galdandi fyri aðrar íløgur, ið eru ætlaðar at verða gjørdar í 2008. Tí metir tekniska umsitingin, at tað er møguligt at gera nakrar umraðfestingar innan íløgurnar fyri 2008, við tí fyri eyga at halda fram við arbeiðinum av Glyvursvegnum 6. stig.

Á hesum grundarlagi mælir tekniska umsitingin til at umraðfesta íløgurnar og flyta játtan til Glyvursveg 6. stig soleiðis:

| Konto | Verkætlan | Broyting 2008 | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| | **Fígging til Glyvursvegur 6. stig** | | |
| 11871 | Glyvursvegur 6. stig | 150.000 | restjáttan frá 2007 ella fyrr |
| 11868 | *at flyta frá brúgv um Sandá | 5.000.000 | er viðmælt av bygginevndini á fundi 07.05.08 |
| 11822 | *at flyta frá Glyvursvegur | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11841 | *at flyta frá Reynsgøtu | 400.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11848 | *at flyta frá gongubreyt við Vegin Langa | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11863 | *at flyta frá ferðslutrygd v. Hoyvíkar skúla | 370.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11889 | *at flyta frá vegagerð á Dánjalstrøð | 2.000.000 | játtan frá 2007 |
| 11875 | *at flyta frá vegur, kloakk o.a. á útstykking á Argjum hjá V. Dalsgaard (komm. partur) | 3.330.000 | játtan frá 2008 |
| | **Tilsamans** | **11.850.000** | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
1. at arbeiða fram ímóti at gera eina avtalu við P/F Articon um kostnað og tíðarætlan fyri leingjan av Glyvursvegi til verandi íbinding til útstykkingina á Hamrinum
2. at játta kr. 11,7 mió. til konto 1011-90-11871 við flytingum, sambært omanfyri standandi yvirliti.
3. at heita á umsitingina fyri keyp og sølu um beinanvegin at gera avtalu við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti Høgni Mikkelsen tekur støðu á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá støðuni í málinum um 6.stig.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til meirveitingar í sambandi við innanhýsis frágreiðing um fíggjarligu viðurskiftini frá tekniska stjóranum og um niðurstøðuna frá bygginevndini um ikki at koma við tilmæli til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Einar Brimnes var ikki til staðar undir viðgerðini.

Tekniski stjórin greiddi frá innanhýsis statusfrágreiðingini frá 2. febr. 2009, um 5. og 6. byggistig.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka spariuppskotini til eftirtektar, og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 20,4 mió. afturat til 5. og 6. byggistig.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir seg ikki kunna taka støðu til málið enn, av tí at hann fekk tilfarið í málinum sama dag, sum fundurin varð hildin.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki á fundinum, meðan nevndin viðgjørdi bygginevndina.

Ein meiriluti átalar harðliga handfaringina hjá bygginevnd og umsiting í málinum. Somuleiðis tekur nevndin, ikki undir við, at bygginevndin ikki vil geva nevndini tilmæli í málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Mál nr. 2008-0257 og 2008-1295 vóru viðgjørd undir einum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd.

Eisini samtykt at seta í verk óvilduga kanning fyri at staðfesta ábyrgd í hesum málum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Málið um endaligan byggiroknskap fyri Glyvursveg 6. stig hevur verið til viðgerðar í bygginevndini 9. mars 2012. Tilmælið frá bygginevndini verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini (Sí j.nr. 2007-1283/18).

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við SEV og FT-Net. SEV og FT-Net eru sinnaðir at gera avtalu við kommununa um helvtarbýti av útreiðslunum.

Kommunan kravdi upprunaliga kr. 1.001.129,- frá SEV og kr. 645.443,- frá FT-Net. Umsitingin greiðir frá avtaluni. Víst verður til skjal nr. 2008-1295/17.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum til avtalu um helvtarbýti og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Málið tikið av skrá.

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin hava havt fundir við SEV og FT-Net, at kanna um møguleikar vóru fyri at gera semju millum partarnar. Úrslitið av fundunum var, at SEV og FT-Net eru sinnaðir at gera semju við kommununa um at rinda helvtina av kravi kommununar.

Kommunan kravdi upprunaliga kr. 1.001.129,- frá SEV og kr. 645.443,- frá FT-Net. Umsitingin greiðir frá uppskotinum til semjur. Víst verður til skjal nr. 2008-1295/17.

Við hesum uppskotum til semju gerst samlaða úrslitið av byggiroknskapunum fyri bæði byggistigini fylgjandi:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Glyvursvegur 5. Byggistig: | hall á | kr. | -615.485,- | |
| Glyvursgevur 6. Byggistig: | avlop á | kr. | 178.782,- | |
| Nettoúrslit: | hall á | kr. | 463.997,- | v. mvg |

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið til semju. Víst verður til frásøgn nr. 11 frá fundi í bygginevndini, j. nr. 2007-1283/19.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir nevndini til at taka undir við uppskoti til semju við SEV og FT-Net um helvtarbýti, galdandi fyri Glyvursvegur 5. byggistig (j. nr. 2008-0257) og Glyvursvegur 6. byggistig (j. nr. 2008-1295), og, um avgjørt verður at taka undir við semjuni, at beina málið um fígging í hesum sambandi, í býráðið um fíggjarnevndina, við tilmæli um hvussu hallið skal fíggjast.

**Tilmæli frá umsitingini:**
Vísandi til tilmæli frá bygginevndini um at gera semju við SEV og FT-Net, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at fíggja írestandi upphædd álj. kr. 463.997,- fyri 5. og 6. stig av Glyvursvegi,- av íløgum fyri vegir 2012, §6, kto. 8175.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 28. juni 2012:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**169/12** **2012-0714 GS**

**Landsverk søkir um byggiloyvi til 2 nýggjar gróðurhallir á matr. nr. 1338, Hvítanesvegur 3a, Hoyvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá Landsverk, um at taka gomlu bygningarnar, ið eru í ringum standi, á plantusøluni niður og byggja tvær nýggjar hallir, sum í skapi, stødd og tilfari tosa sama mál sum verandi hallir. Ætlanin er tó at hækka nýggju hallirnar ein hálvan metur, har hæddin á verandi síðum er 1,7 m, sum í nýggju hallunum verður 2,2 m, soleiðis at arbeiðsumstøðurnar innan verða bøttar. Nýggju hallirnar verða úr timbri. Konstruktiónin verður límtræðsbogar, tekjan myrkt og grátt eternit, síður og endar slættur svartur 8" timburklædningur.

Skriv er innkomið frá Skógfriðingarnevndini og Nattúrufríðingarnevndini.
Málið er til viðgerðar í Yvirfriðingarnevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í serstakari byggisamtykt fram við Hoydalsá, sum er vakstrargarðar-øki og ein partur liggur í viðarlund-øki.

*4. gr. VIÐARLUND, VAKSTRARGARÐAR OG URTAGARÐAR.*
*Lendi verður lagt til viðarlundir við trøum og runnavøkstri. Serstøk øki verða løgd til royndarplantingar í vakstrargørðum í høvuðsheitinum so sum víst á viðfestu serkortunum.*

*Øki til urtagarðar (kolonihavar) verður lagt av oman fyri Svartafoss.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkini, matr. nr.1338. Hoyvík, er 13.210 m² til víddar.
Ábygt eru 2 bygningar á ognini.
Bygningarnir eru ávikavíst 360 m² og 504 m² til víddar.
Tali av bilstøðum verður tað sama sum í dag.
Hædd til yvirsyll er 2,2 m
Hædd til mønu er uml. 5 m.

Skóðfriðingarnevndin og natúrfriðingarnevndin hava viðmælt umsóknini, yvirfriðingarnevndin hevur ikki svarað enn.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn, journal nr. 2012-0714/1
Tekningar, journal nr. 2012-0714/1
Fráviksskjal, journal nr. 2012-0714/5
Skriv frá skóðfriðingarnevnd, journal nr. 2012-0714/3
Skriv frá natúrfriðingarnevnd, journal nr. 2012-0714/2

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti sum frávik, um yvirfriðingarnevndin viðmælir umsóknina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Jan Christiansen biður um málið á skrá.

**Býráðið 28. juni 2012:** Atkvøtt varð um tilmæli hjá Jan Christiansen, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 5 ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Elin Lindenskov

Greiddi ikki atkvøðu: Levi Mørk

**170/12** **2012-0454**

**Ásetingar fyri neystaøkir í Nólsoy og framtíðar nýtslumøguleikar**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
**Nólsoyarnevndin 21. februar 2012:** Málið umrøtt. Umsitingin ger uppskot at umrøða við nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Verandi ásetingar fyri kap. IV, § 23, øki F: Neyst og bátapláss í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

§ 23. Øki F: Neyst og bátapláss

1. Økið verður lagt av til neystabygging og pláss at seta bátar á.

2. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki verða breiðari enn 4,0 m og hægri enn 4,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og hon skal verða í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Bygdarráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí.

3. Á bátaplássum er einans loyvt at gera bygningar, ið neyðugir eru til raksturin, t.d. amboðshús.

Endamálið við eini broyting av ásetingunum fyri øki F í byggisamtyktini fyri Nólsoy er, at neystini kunnu nýtast til onnur endamál enn bert neyst. Umsitingin metir at tað er týdningarmikið at øki í minsta lagi verður nýtt lutvíst til neyst.

Í niðanfyristandandi uppskotið til ásetingar fyri øki F: og bátapláss, er loyvt at innrætta frítíðarhús uppi á loftinum í neystunum, meðan tað tó altíð er ein treyt at bátur er í neystinum, tvs, at hetta verður varðveitt sum neyst, og kann bert inrættast til frítíðarhús, treytað av at bátur er í neystinum.

Víðari skulu ásetingar vera um útsjónd, so at eyðkenda neystabyggingin ikki hvørvur úr bygdamyndini. Hetta má arbeiðast neyvari við, men hetta skal sigast frá sum ein fortreyt fyri alt annað arbeiðið við at gera aðrar ásetingar enn verandi, fyri neysta økið.

Uppskot til nýggja § 23 í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

§ 23. Øki F: Neyst og bátapláss

1. Økið verður lagt av til pláss at seta bátar á, og neystabygging, sum lutvíst kunnu innrættast til frítíðarhús.

2. Tað er ein treyt fyri at kunna innrætta neystið lutvíst til frítíðarhús, at bátur er til neystið, og innrættingin til uppihald, kann bert fara framm á loftinum við nøktandi rýmingarmøguleikum eftir galdandi reglum fyri hetta.

3. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki verða breiðari enn 4,0 m og hægri enn 4,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og hon skal verða í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Bygdarráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí.

4. Neyst, sum lutvíst verða innrættaði til frítíðarhús, skulu íbindast skipaða kloakk.

**Nólsoyarnevndin 29. mai 2012:** Nevndin setur spurning viðvíkjandi støddini av neystunum. Nevndin tekur undir við ætlanini, og borgarstjórin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at taka undir við omanfyri nevndu broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Ein meiriluti Levi Mørk, Jákup Suni Simonsen og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jan Christiansen vísir til, at við verandi broyting ber als ikki til at innrætta neystini til partvís frítíðarhús og mælir til at umsitingin ger nýtt uppskot til §23 í byggisamtyktini, so at ætlanin við broytingini gevur meining.

**Býráðið 28. juni 2012:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Jákup Símun Simonsen, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**171/12** **2012-1374 KF**

**Uppskot til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn og heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv.**

Í sambandi við viðgerð av málið um leigusáttmálar til neystini úti á Bakka (j.nr. 2010-2041), hevur Fíggjarnevndin á fundi 16. februar og 26. apríl 2012 samtykt at

heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til heildarætlan fyri økið við Vágsbotn og undir Bryggjubakka, sum inniheldur broytingar av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn og eitt uppskot til skipan av økinum frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv.

Ein "plansja" av heildarætlanini verður framløgd á fundinum.

<u>Broytingar av serstøku byggisamtykt nr. 4:</u>
Økið undir Bryggjubakka eitir D1 í serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn.

Fyri at skapa eina størri heild í økinum við útvendum virksemi allan vegin fram við bryggjuni verður skotið upp, at seta eina nýggja áseting í gr. 2 Nýtsla økisins, við kravið um at niðasta hædd skal nýtast til útvent virksemið.

Hetta merkir ikki at teir bygningar sum í løtuni hava skrivstovur ella annað í niðastu hædd, skulu broyta virksemið. Men um eitt nýtt leigumál kemur inn í bygningin á niðastu hædd, skal hetta hava útvent virksemi.

2. gr. Nýtsla økisins

Eindirnar D: Vinnulívsendamál

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og bygging skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.

b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.

c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki,royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.

d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygningunum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

Økið úti á Bakka, har neystini liggja, er í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn C4 øki ætlað til Almenn endamál og bústaðarendamál.

Fyri at menna ferðafólka- og býarlívið verður skotið upp at broyta byggisamtyktina við at leggja økið úti á Bakka sum eitt neystaøki við ásetingum um nýtslu av neystunum til frítíðar- og ítróttarvirksemi, sum hevur við sjógvin at gera, t.d. kappróður og kajakk, og til onnur ting sum kunnu menna ferðafólka- og býarlívið her, t.d. felagsskapir av ymiskum slag.

Uppskot til nýggjan umráðispart F-neystaøki.

2. gr. Nýtsla økisins

Eindirnar F:

a. Eindin F skal nýtast til neyst til frítíðar- og ítróttarvirksemi ið hevur við sjógvin at gera

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við heildarætlanini og broytingini í byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**172/12** **<u>2012-1494</u>**

**<u>Reglugerð um asbest-burturkast</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Arbeiðseftirlitið hevur við eftirlitisvitjan í.s.v. móttøku av asbest-burturkasti á tyrvingarplássinum í Húsahaganum tann 18/6-2012 gjørt vart við, at mannagongdir mangla í.s.v. asbest-burturkast og at neyðugt er at fáa hetta uppá pláss sum skjótast, um móttøka av asbest-burturkasti skal kunna halda áfram.
Arbeiðseftirlitið vísti eisini á, at eftirsum tað kann vera trupult ella ógjørligt at avgera, um asbest er í eternitt-plátum, má alt eternit eisini klassificerast sum asbest-burturkast.

Kommunala Brennistøðin hevur gjørt uppskot til reglugerð fyri asbest-burturkast, j.nr. 2012-1494/3. Reglugerðin er send Arbeiðseftirltinum til kunningar/viðmerkingar Innanhýsis mannagongd fyri móttøku av asbest-burturkasti er somuleiðis gjørd og verður sett í verk beinanvegin.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri kommunalu brennistøðina mæla heilsu- og umhvørvisnevndini til at samtykkja reglugerðina um asbest-burturkast og at beina málið í býráðið til endaliga samtyktar.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Bárður Michelsen, leiðari á kommunalu brennistøðini, kunnaði um reglugerðina um asbest burturkast.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**173/12** **2012-1592**

**Broyting av fíggjarætlanini fyri 2012 við eykajáttan**

Býráðið hevur samtykt, at avdráttirnir í 2012 skulu gjaldast og at avdráttir uppá tkr. 11.500 skulu fíggjast við meirinntøkum í 2011 (jnr. 2012-0132). Avdráttirnir eru íalt 17.517. Sostatt restar fígging av 6.017. Harumframt hevur kommunan tapt eitt sakarmál, sum kemur at kosta tkr. 2.242. Sostatt er neyðugt við fígging uppá tkr. 8.259 íalt.

Nú roknskapurin fyri 2011 er liðugur kann staðfestast, at inntøkurnar eru tkr. 27.000 hægri enn mett í fíggjarætlanini.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til, at meirinntøkurnar verða brúktar til fígging av nevndu útreiðslum og at fíggjarætlanin verður broytt soleiðis:
25.64.11 Útvegan av gjaldførið hækkar tkr.8.259
25.64.11 Upptøka av lánum lækkar tkr. 6.017
20.52.39 Aðrar inntøkur (20910) hækkar tkr. 2.242

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**174/12** **2007-0874**

**Landsrættardómur í sakarmáli millum Tórshavnar kommunu og Leiv og Gunnu Andreasen**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Eystari Landsrættur dømdi tann 16. apríl 2012 Tórshavnar kommunu at rinda Leivi og Gunnu Andresen 2.400.000,00 kr. í endurgjaldi. Harumframt skal kommunan rinda 873.643,33 kr. í prosesrentu frá 6. mars 2007 at rokna umframt sakarkostnað á 321.518,33 kr. Samlaða endurgjaldsupphæddin er 3.595.161,33 kr.

Eystari Landsrættur staðfesti við hesum dómin í Føroya Rætti tó við teirri broyting, at endurgjaldsupphæddin varð hækkað úr 2.291.601,00 kr. upp í 2.400.000,00 kr.

Endurgjaldið skal latast í sambandi við, at Tórshavnar kommuna í 1999 broytti serstøku byggisamtykt nr. 7, sum viðvíkjandi matr. nr. 684p, 670y, 670x, 670a og 670df, Tórshavn, hevði við sær, at økið fór frá at vera sethúsaøki til at vera fríøki/øki til almenn endamál.

Við hesi broyting mistu eigararnir møguleikan at byggja á økinum. Í árunum frá 2000-2006 vóru ávísar samráðingar millum partarnar um aftur at broyta byggisamtykina, so byggjast kundi á økinum, og samráðingar um makaskifti og møguligt keyp av økinum frá Leivi og Gunnu Andreasen.

Hesar samráðingar endaðu tó úrslitaleysar og bæði í 2006 og 2007 boðaði kommunan frá, at hon ikki var áhuga í at keypa økið ella gera makaskifti við annað lendi.

Eigararnir stevndu tískil kommununa eftir endurgjaldi tann 6. mars 2007, og kommunan varð bæði í Føroya rætti og Eystara Landsrætti dømd at rinda endurgjald ísv. broytingina av byggisamtyktini móti at eigararnir skeyta kommununi ognirnar.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til at ávísa fígging kr. 3.595.161,33 at rinda Leivi Andreasen og Gunnu Andresen í endurgjaldi sbr. dóminum í Eystara Landsrætti.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna og Bjørn á Heygum, advokatur hjá Leivi Andresen og Gunnu Andresen hava tann 11. juni gjørt semju í málinum, ið inniber, at Gunna og Leivur Andresen avhenda matr. nr. 670x, 670a og 670f til Tórshavnar kommunu fyri 1.400.000,00 kr. umframt rentur frá stevningsdegnum áljóðandi 520.805,83 kr. og sakarkostnað áljóðandi 321.000,00 kr., íalt 2.242.323,83.

Við semjuni verður kravið um yvirtøku av matr. 670p og 670y slept, og tí minkar endurgjaldið, ið kommunan er dømd at rinda eigarunum, við einari upphædd, ið svarar til kostnaðin av matr. nr. 670p og 670y.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til at ávísa fígging kr. 2.242.323,83 kr. at rinda Leivi Andresen og Gunnu Andresen til fulla og endaliga avgerð í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 2.242.323,83 av konto 20910 at rinda Leivi Andresen og Gunnu Andresen til fulla og endaliga avgerð í málinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**175/12** **2009-1489**

**Boðanesheimið - alternativ orkuskipan**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært byggiskránni fyri Boðanesheimið er dentur lagdur á at byggja ein sokallaðan lág-orku bygning smbr. orkuklassa 2 í BR-08, svarandi til eina árliga brutto orkunýtslu á 70 kWh fyri hvønn fermetur. Hettar merkir, at herd krøv eru til bæði tættleika og bjálving, umframt at "orkuramman" fyri bygningin skal prógvast í høvuðsprojektinum eftir nærri ásettum reglum.

Afturat hesum leggur byggiskráin upp til alternativa orkuútvinning smbr. pkt. 6.4.4:
"Grøn orkuveiting:
Umframt tilboði við oljufýrdum hitaverki, skal alternativt tilboð gevast við jarðhitapumpu at nøkta samlaða orkutørvin til upphiting og ventilering av bygningi, og upphiting av brúksvatni. Staðseting og tal av holum skal gerast í samráð við Jarðfeingið.

Uppskotið til grøna orkuveiting verður lýst við frágreiðing, principtekning og útrokning av COP-virði, árligari orkusparing og afturgjaldstíð av meirkostnaði."

Í vinnandi tilboðnum frá ArtiCon var alternativt roknað við at borað 25 hol niður á 200 m í økinum kring bygningin og knýta hesi í 4 hitapumpur. Fjarstøðan millum

hesi hol er 40 m, svarandi til ein økistørv á uml. 30.000 fermetrar. Meiríløgan er um 1,7 mió.kr., árliga orkusparingin 16 kWh fyri fermeturin og afturgjaldstíðin um 15 ár við grundarlagi í verandi kostnaðarstøði.
Bygningurin er annars sera væl bjálvaður og í høvuðsheitum upphitaður við gólvhita í eini lágtemperatur-skipan (~55o), og sostatt sera væl egnaður til eina hitapumpuloysn.

Undir sáttmálasamráðingunum við ArtiCon í nov-des 2010 gjørdist greitt, at neyðugt var at leingja byggitíðina 2 til 3 mánaðir um jarðhitaskipan var vald, orsakað av nógvu holunum, ið skuldu borast í økinum kring bygningin. Kravið um tíðarleingjan, saman við óvissum um m.a. trygd fyri hita-veitingini, tá ongar royndir eru við jarðhita-skipan av slíkari stødd í Føroyum, førdi til, at avgerð varð tikin um at bíða við alternativari orku fyribils.

Síðan byggingin byrjaði hevur bygginevnd og umsiting, saman við arbeiðstakaranum kannað møguleikan fyri burðadyggari loysn í sambandi við eina hitapumpu-skipan, ið ikki nervar verandi bygging. Komið er fram til, at møguleikar eru eystanfyri vegin Yviri við Strond. Vansin er tó, at økið millum sjóvarmálan og vegin er fríøki/friðað øki, ið krevur serstakt loyvið við serstøkum atlitum í samband við inntriv í lendi. Eisini er økið beint yvirav Boðanesheiminum privat ogn, og verður tískil neyðugt at nýta økið sunnanfyri, sum í løtuni verður nýtt til tjaldingarpláss.

Í sambandi við at farið verður yvir um vegin, hevur ein nýggjur møguleiki stungið seg upp, nevniliga at nýta sjóvarhita heldur enn jarðhita. Møguleikin er einastandandi, tí staðsetingin av bygninginum er so lágt og tætt at sjóvarmálanum. Fyrimunirnir við sjóvarhita fram um jarðhita eru, at økistørvurin er sera lítil, bert eitt lítið pumpuhús niðri við sjóvarmálan, og at tað slepst undan at órógva annað øki. Vansin er, at bert ein roynd higartil er gjørd í Føroyum við sjóvarhita, og ongar langtíðarroyndir eru. Tó skal viðmerkjast, at henda eina royndin, eftir ávísar tillagingar, vísur seg at verða sera væleydnað, og teknikkurin aftanfyri skipanina er sera líkur vanliga jarðhita-skipanini og sostatt ikki ókendur.

Bygginevndin hevur tikið avgerð um, at bygningurin ið best møguligan mun verður fyrireikaður til hitapumpuskipan, jarð- ella sjóvarhita, soleiðis, at leiðingar verða lagdar úr fýrrúmi oman til vegin, og pláss er tøkt í kjallara til hitapumpur, vatngoymslutangar o.a., sum krevst í hesum sambandi. Hesar fyrireikingar kosta undir kr. 20.000 at fremja nú og viðføra, at tað seinni slepst undan av grava økið upp inn undir bygningin og gera størri broytingar inni fyri munandi størri kostnað.

Hinvegin metir bygginevndin ikki tað verða hennara avgerð at taka støðu til, um stig skal takast til fult og heilt at fara frá ætlaða oljufýrda hitaverkinum og yvir til eina hitapumpuskipan nú, og saknar einfalt eina politiska støðutakan til spurningin um "grøna orku" sum heild at styðjað seg til.

Verður avgerð tikin um at nýta hitapumpuskipan nú, so kunnu ketlar, oljutangi og skorsteinur fyri uml. kr. 2-300.000,- sparast burtur, tó verður neyðugt við einari eykajáttan á fyribils uml. 1,7 mió.kr. fyri sjálva hitapumpuskipanina, íroknað boran av holum ella pumpuhús.

**Sosiala nevnd 3. mai 2011:** Sosiala nevnd samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina, at taka avgerð um burturav at nýta sjóvarhita sum orkuskipan til heimið og at fáa neyðuga fígging til vega.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og avgreiða spurningin um fígging, tá ið kanningararbeiðið er avgreitt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt og at fíggja meirkostnaðin innanfyri verandi karmar

**Nýtt:**
Forkanningarnar eru nú komnar undir land, og vísur tað seg, at samlaði kostnaðurin verður kr. 4,8 mió. kr., sum er 3,1 mió. kr. meir enn upprunaliga kostnaðarmetingin á 1,7 mió. kr.

Orsøkirnar til meirkostnaðin eru als ikki nøktandi lagdar fram fyri umsitingini, men millum annað er talan um eitt væl størri anlegg, ið framleiðir 240 KW ímóti 125-160 KW, sum upprunaliga upplýst.

Ivasamt er um meiríløgan nakrantíð verður vunnin inn aftur. Tó valdast sjálvandi hvussu oljuprísurin verður í framtíðini.

Sum støðan er nú, so eru tvinnir kostir í at velja:

1: Venda aftur til oljufýrdar ketlar, sum í upprunaliga projektinum. Hetta viðførur smbr. útgreiningum hjá ArtiCon ein meirkostnað á kr. 695.000 fyri forkanningar av grønari orku, umframt ávísa umprojektering. Nevnast skal tó, at møguleiki er seinni at venda aftur til t.d. sjóvarhita.

2: Halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og fáa neyðuga fígging til vega. Verandi íløgujáttan til Boðanesheimið ber ikki eina tílíka meirútreiðslu.

**Sosiala nevnd 6. desember 2011:** Nevndin átalar, at so stórur munur er á uppruna kostnaðarmetingini, sum støða er tikin út frá, og endaliga tilboðnum.

Ein meirluti, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen, vísir til, at tilboðið frá ArtiCon er 3,1 mió. kr. dýrari, og mælt verður tí til at venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum, men at møguligt skal verða at venda aftur til sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, mæla til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í sosialu nevnd og venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum og at møguligt verður at binda í eina skipan við sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmæli frá borgarstjóranum, um at arbeiða víðari við sjóhitaskipan og beina málið í fíggjarnevndina at finna fígging.

**Ískoyti:**
Articon hevur í skrivi dagfest 14. desember 2011 boðað kommununi frá, at kostnaðurin fyri lidna anleggið verður kr. 4.800.000 u/mvg, men íroknað allar veitingar og tær óvissur, sum Articon hevur víst á í frágreiðing og tilboði.

Býráðið samtykti 26. mai 2011, at meirkostnaðurin, sum tá varð mettur til kr. 1,7 mió, skuldi fíggjast av verandi íløgukarmi til verkætlaninia. Fíggjartørvurin, sum verður at leggja aftrat samlaðu íløgujáttanini til verkætlanina, er tí kr. 3,1 mió umframt mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at fíggja meiríløguna soleiðis:

Fylgjandi íløgujáttanir (frá 2011 og eldri) verða lækkaðar við nevndu upphæddum.

| **Deild** | **Økið** | **Løgunr** | **Heiti** | **Kr. tús.** |
|---|---|---|---|---|
| 2775 | Eldrarøkt | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 750 |
| 4175 | Dagføring av skúlum | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | L62007 | Bygningur til lendisdeildina | 500 |
| 6575 | Kirkjugarðar | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| 7175 | Renovasjón | L71001 | Tyrvingarplássið á Glyvursnesi | 500 |
| 7476 | Smábátahavnir | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| | **Tilsamans** | | | **3.250** |

Upphæddin á 3.250.0000 kr verður flutt til deild 2775 Eldrarøkt (íløgur) L27002 Boðanesheimið.

**Fíggjarnevndin 10. januar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon á 4,8 mió kr., ið verður at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti og at heimila umsitingini at gera ískoytissátmála við Articon um arbeiðið.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, taka ikki undir við tilmælinum vísandi til, at sjóvarhitaorkan ikki er lønandi fyri kommununa, og at kommunan onga trygd hevur fyri íløguni á 4,8 mió. kr.

**Ískoyti:**
Vísandi til málsetningar býráðsins at arbeiða fyri burðardyggum og umhvørvisvinarligum loysnum, hevur býráðið 14. desember 2011 tikið avgerð um at arbeiða víðari við sjóvarhitaskipan til Boðanesheimið. Talan er um eina nýggja slóðbrótandi loysn, ið ætlandi skal gerast ein varði innan grønar orkuloysnir, og tí mælir samgongan býráðnum til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og taka av tilboðnum hjá Articon á 4,8 mió kr., ið verður at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti og at heimila umsitingini at gera ískoytissáttmála við Articon um arbeiðið.

**Býráðið 10. januar 2012:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá Heðini Mortensen, Jógvani Arge og Elini Lindenskov í fíggjarnevndini 10. januar 2012, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri og 0 ímøti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Bogi Andreasen.

**Býráðið 26. januar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við sjóvarhitan, ið skal hita Boðanesheimið, verður neyðugt at gera eitt pumpuhús so tætt at sjóvarmálanum sum gjørligt.

Seinnu gjørdar kanningar vísa, at besta stað at leggja eitt tílíka pumpuhús ið er væl vart móti aldu, er inni á matr. nr. 1306a sum skjal 2011-0877/28 vísur. Talan er um privat øki ið eftirkomarar hjá Júst Sivertsen eiga.

Skilabesta loysnin er, at TK keypir uml. 150 fermetrar burturav matr. nr. 1306a, at byggja ætlað pumpuhúsið á, og leggja hettar saman við matr. 672a ið Tórshavnar Kommuna er ánari av. Hettar tryggjar ótarnaða atgongd til eftirlit og viðlíkahald av pumpustøðini.
Kostnaðurin fyri økið er uml. 13.500,- við grundarlagið í prísum frá Búnaðarstovuni, nevniliga kr. 89,- fyri fermeturin.

**Tilmæli:**
Bygginevndin fyri Boðanesheimið biður um heimild til, at taka upp samráðingar og at gera avtalu við ánararnar av matr. nr. 1306a um keyp av uml. 150 fermetrar at leggja saman við matr. nr. 672a, í øðrum lagi at gera ein leigusáttmála um umrødda økið, og at gera avtalu um at leggja leiðingar frá pumpuhúsinum gjøgnum matr. nr. 1306a. Kostnaðurin verður fíggjaður av ókendum innan fyri játtanina til verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir staðiliga frá at nýta ætlaðu orkuskipanina við sjóvarhita.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Kunnað varð um, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:**

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Kunnað varð um, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Útsett.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við eigararnar av matr. nr. 1306a, og eru tey sinnað at selja kommununi økið fyri 200 kr./m², íalt kr. 30.000. Harumframt ynskja eigararnir eitt endurgjald á kr. 30.000 kr. fyri tann ampa, ið eigararnir hava av, at kommunan fer gjøgnum ognina og leggur leiðingar í jørðina og tann miss, eigararnir hava av ikki at kunna nýta trøðna í byggitíðarskeiðinum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa 150 m² burtur av matr. nr. 1306a fyri 200 kr./m² og til at veita eigarunum endurgjald áljóðandi 30.000 kr. fyri sakn av lendinum í byggitíðarskeiðinum og ampar í sambandi við bygging av pumpuhúsinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum til at keypa uml. 150 fermetrar burtur av matr. nr. 1306a fyri 200 kr./m². Harumframt samtykt at veita eigarunum endurgjald áljóðandi 30.000 kr. fyri sakn av lendinum í byggitíðarskeiðinum og ampar í sambandi við bygging av pumpuhúsinum. Kr. 60.000,- verða at játta av konto L27002.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**176/12** **2012-0493**

**Dagstovnurin Birkilund inniklima**

Í sambandi við eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund hevur Arbeiðseftirlitið tikið loftsplátu til nærri kanningar. Kanningarúrslitið gevur ábendingar um, at bygningurin kann vera fongdur við blámusoppi. Eftirlitsvitjanin staðfesti fleiri lekar undir loftinum í bygninginum, og at blettir eru á fleiri loftsplátum. Arbeiðseftirlitið hevur í skrivi givið kommununi boð um at seta í verk støðukanning av fukti og blámusoppi í byginginum.

Kommunan hevur biðið HMP Consult gera hesa kanning, sum væntandi bera okkum úrslitið um tríggjar vikur.

Fyri tíð síðan, tá ítøkiliga varð arbeitt við at stovnurin skuldi gerast kommunalur, varð gjørd ein støðulýsing til tess at staðfesta, hvørjum standi bygningurin var í. Heitt varð á HMP Consult at gera støðulýsingina, sum varð liðug í mars 2009. Sum avtalað hevur HMP Conslut raðfest og staðfest hvørjar ábøtur vóru átroðkandi, minni átroðkandi og ábøtur, sum mælt varð til blivu gjørdar. Hesar raðfestingar vóru kostnaðarmettar, og sum sæst niðanfyri eiga munandi ábøtur at verða gjørdar á bygningin.

Fyrsta raðfesting inniheldur í høvuðsheitum at skifta takið og alt sum har til hoyrir, eisini loftsklæðingin innanfyri. Eisini eru ábøtur á ventilatiónina við í hesum. Raðfesting 2 inniheldur útvendiga bjálving og klæðing av betongveggunum, og raðfesting 3 er millum annað at skifta hvítvørur og gera aðrar ábøtur á m.a. gólvini.

Niðanfyri er ein uppseting út frá støðulýsingini og tí, sum mett er kemur afturat.

| | |
|---|---|
| Raðfesting 1 | kr 4.683.882 |
| Raðfesting 2 | kr 445.000 |
| Raðfesting 3 | kr 475.000 |
| Samlað | kr 5.603.882 |

Hesi tøl eru uttan ókent, uttan mvg, uttan ráðgeving og eftirlit, uttan prístalsviðgerð og projektumsiting.

Verður Birkilund samanborin við Dagstovnin í Hoyvík, eru ávís viðurskifti, ið ganga aftur. Báðir stovnarnir eru tiknir í brúk í 1983 sum sjálvsognarstovnar, báðir hava havt lekar frá takinum í fleiri ár, betongútveggir eru partvís í báðir bygningunum.

Brúka vit eina samlaða kostnaðarmeting við støði í støðulýsingini frá 2009, kann hetta roknistykkið setast upp:

| | |
|---|---|
| Samlað kostnaðarmeting | kr. 5.603.882 |
| Ókent 30% | kr. 1.681.164 |
| Prístalsviðgerð | kr. 200.000 |
| Samlað | kr. 7.484.046 |
| | |
| Ráðgevara útreiðslur 12% | kr. 898.085 |
| Projektumsiting hjá TK | kr 200.000 |
| Samlað uttan mvg | kr 8.582.131 |
| Samlað við 6,25% mvg (536.383) | **kr 9.118.514** |

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
HMP Consult hevur latið kommununi omanfyri nevndu kanning við fleiri tilmælum, sum kommunan síðani hevur virkað eftir. Bráðfeingistilmæli var at tetta allar lekar í tekjuni og við vindeygabond v.m., og at gera eina høvuðsreingerð at fáa sonevndu MM-tølini niður á nøktandi støði. Harumframt at fáa luftskifti at virka optimalt. Eisini var rátt frá at nýta 3 høli.

Hetta eru tó at meta sum fyribils átøk, og sum lýst omanfyri er neyðugt við umfevnandi høvuðsumvæling. Í hesum sambandi hevur umsitingin mett rættast at steingja bygningin í summar, og at børnini fáa dagstovnapláss í øðrum hølum.

Eftir umbøn hevur HMP Consult gjørt kostnaðarmeting fyri høvuðsumvæling. Sum alternativ til hetta er eisini gjørd kostnaðarmeting av at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn í somu stødd.

Høvuðsumvæling av verandi bygningi, við nýggjari tekju, nýggjum klædningi og nýggju tekniskum installatiónum íroknað kravdar dagføringar í m.a. neyðhurðar og rýmingarleiðir er mett til kr. 20-21 mió v/mvg.

Ein niðurtøka og burturbeingin av verandi bygningi, byggja nýggjan bygning í somu stødd og nýgerð av uttanumøki er mett at kosta kr. 33-34 mió v/mvg. Tá er roknað við einum miðal fermetraprísi á kr. 20.000.

Hóast broytingar í barnatalinum, er tørvur á júst hesum stovninum. Hann er millum størstu stovnar í kommununi, og harumframt er hann einasti stovnur aftrat Lítlaskógi, sum serliga hevur eysturbýin sum upptøkuøki.

Ein høvuðsumvæling við nøkrum dagføringum av eitt nú brunaviðurskiftum, konstruktiónstrupulleikum og líknandi er fyribils mett til kr. 20-21 mió v/mvg. Ein høvuðsumvæling vil tó ikki loysa uppá fleiri minni heppin viðurskifti viðvikjandi funktiónum, hvussu góður bygningurin er fyri rørslutarnað, orkunýtslu o.ø.

Ein nýbygging er dýrari, men tá fæst ein stovnur, sum lýkur øll nútíðar krøv, eins og tað eisini gevur møguleika fyri at skipa bygningin á grundini øðrvísi, soleiðis at betri umstøður fáast á útiøkinum.

Neyðugt er tí við prinsippavgerð um, hvørt bygningurin skal høvuðsumvælast ella takast niður og nýggjur byggjast upp í staðin á sama stað. Tað er lítil ivi um, at besta framtíðartryggjaða loysnin bæði í mun til kostnað og funktiónir er at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn, sum er normeraður til nakað sama tal av børnum.

Neyðugt er eisini at gera ætlan fyri, hvussu arbeiðið skal raðfestast í mun til íløguætlanina í øllum førum frá 2013. Eingin íløgujáttan er tøk á grein 3 Børn og ung.

Í mun til at seta fígging av til at fyrireika eina verkætlan, hvørt tað so er høvuðsumvæling ella nýbygging, so kann játtast fáast til vega frá sparingini í sambandi við pedagogverkfallið konta 3215 Aðrar útreiðslur. Har eru kr. 3.673.085 tøkar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt verður mælt til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, og at sett verður bygginevnd.

**Mentamálanevndin 16. mai 2012:** Leiðarin á húsaumsitingini kunnaði um málið. Samtykt at biðja umsitingina um eina gjølla fakliga frágreiðing um støðuna á stovninum til næsta fund.

- Frágreiðing løgd fram.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt mælir nevndin til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, at sett verður bygginevnd og at avseta pening til byggingina á fíggjarætlanini 2013 og 2014 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**177/12** **2012-0493**

**Val av býráðslimi í bygginevndina fyri Birkilund sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 28. juni 2012:** Valdir vórðu Jógvan Arge og Jan Christiansen.

**178/12** **2007-0625**

**Eysturskúlin – høvuðsumvæling**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Húsaumsitingin er farin í holt við at umvæla Eysturskúlan. A og B lonirnar eru gjørdar, og nú vanta C, D og E lonirnar.

Húsaumsitingin saman við arkitektinum hava verið á fundi við leiðsluna í skúlanum fyrr í ár. Leiðslan ynskti at E lonin varð gjørd fyrst, tí tey mettu hesa verða mest átroðkandi. Nøkur vindeygu eru skrúvaðið føst fyri ikki at detta úr.

Havandi í huga at hesi eisini virka sum fluktvegir út á takið, er skilagott at gera hetta arbeiðið fyrst.
Sambært fyribils kostnaðarmeting verður hetta arbeiðið mett at koma at kosta uml.10 mill. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir arbeiðið á E-lonina. Hetta merkir, at aftrat teimum 5 mill. kr,. sum Húsaumsitingin hevur sett av til Eysturskúlan í ár, verður neyðugt at kunna seta 5 mill. kr. av játtanina til konto 82 í komandi ár til Eysturskúlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Húsaumsitingin hevur heitt á ráðgevan A3 v/Hans Dávid Dam, ark. og biðið hann gera útbjóðingartilfarið fyri C lonina umframt tekjurnar, sum leiðslan ynskti (ikki E lonin hetta er ein misskiljing).

Innboðin lisitatión varð hildin og inn komu 3 tilboð. Tilboðini lógu upp á 12,9, 14,3 og 17,7 mió. kr. Lægstur við kr 12.938.329,00 lá Sp/f Karstin A.Joensen, byggimeistari í Kollafirði. Meting okkara var 12.027.035 mió. kr.

Fyri lítlum ári síðani fingu vit samlað tilboð frá spf ÁTS fyri bygningspartarnar C, D og E, og var hettar upp 20,9 mió. kr. - Fyri bygningspart C + tekjurnar, skuldi hettar givið kr. 12,6 mió. kr.

Ráðgevin hevur mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað ókent, prístalsreguleringar, prosjekt, eftirlit og byggileiðsla og mvg, og er samlaði kostnaðurin mettur at blíva kr. 16.633.839,22, (skjal 2007-0625/4).

Upprunaliga varð roknað við at játtanin til hetta arbeiði skuldi verða av konto 82, umsiting av bygningum. Men í samband við fíggjarætlan fyri 2008 var avgjørt at talan var ikki um vanligt viðlíkahald, men heldur um eina íløgu í dagføring, og var tí avgjørt at játtanin fyri 2008 til hetta arbeiði skal av íløgum fyri 2008.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at játtaðar verða kr. 16.633.839,22 av íløgum fyri 2008, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Útsett.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilboðið, sum víst verður til í tilmælinum omanfyri, verður fíggjað av íløgum fyri 2008 kr. 13.785.000,00, restupphæddin kr. 2.848.839,22 verða goldnar av konto 82, umsiting av bygningum, skúlamál.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 13.785.000,00 av íløgum fyri 2008.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
C lonin í Eysturskúlanum var liðugt høvuðsumvæld í 2008, sostatt eru A, B og C lonirnar umvældar.
Tá umvælingin av C lonini var liðug, varð í samráð við skúlan avgjørt at bíða eina tíð við framhaldandi umvælingunum, tí skúlin metti, at høvuðsumvælingin órógvar dagliga arbeiðið í skúlanum so mikið, at tørvur var á einum steðgi í eini tvey ár.

Tann tíðin er farin nú, og mælt verður tí til, at høvuðsumvælingin verður tikin upp aftur, og at farið verður í gongd við D lonina.

Ráðgevin metir, at kostnaðurin fyri projekteringina er 314.000 kr. uttan mvg. Við mvg og við at leggja nakað aftrat til óvæntað, verður metti kostnaðurin fyri at projektera liðugt og gera klárt til útboð 370.000 kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Ráðgevin, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar, hevur neyva vitan um bygningin og verkætlanina sum heild, og tí verður viðmælt, at heimild verður givin at gera sáttmála við hann aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 370.000 kr. verða játtaðar av konto 4175, Dagføring av skúlum, til projektering av høvuðsumvæling av D lonini í Eysturskúlanum, soleiðis at hetta umvælingarstigið kann bjóðast út.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 370.000 av íløguætlanini fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fundur hevur verið við leiðsluna í Eysturskúlanum um høvuðsumvælingina av D-lonini. Á fundinum greiddi ráðgevin frá umvælingarætlanini, og skúlin hevði møguleika at gera viðmerkingar.

Ráðgevin hevur projekterað og gjørt kostnaðarmeting. Høvuðsumvælingin fevnir í høvuðsheitum um útveggir, máling innan, nýtt linoleum á gólvini, eftirbjálving, bøtta brunatrygd, gardinur, hitaskipan, el-hurðalæsiskipan og goymslurúm til klor, sum verður brúkt í svimjihylinum.

Sambært kostnaðarmeting, sum er í málinum, verður samlaði kostnaðurin kr. 11.572.412,11.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina í august 2012, og arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 11.572.500 kr. av konto 4175, Dagføring av skúlum, til høvðusumvælingina av D-lonini í Eysturskúlanum

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**179/12** **<u>1999-0345 BYGM</u>**

**<u>Høllin á Hálsi - nýtt gólv</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og

umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða “høllin” í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í “føroyskum kr” 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |

| | | |
|---|---|---|
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |

Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við kr. 11.000.000
Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við kr. 9.000.000




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

at peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

at peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
|---|---|
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |

Metingin hjá HMP-Consult 6.725.000,00 kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el-

og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**180/12** **<u>2007-1050</u>**

**<u>Makaskifti millum arvingarnar eftir Edith Holm av matr. nr. 1090 til 1091, Tórshavn (Torstein, Kári og Turið Holm)</u>**

**Viðvíkjandi matr. nr. 1091, Tórshavn.** Eigarar : Systkini, Torstein Holm, Kári Holm og Turid Holm.

Eigararnir av matriklinum hava vent sær til kommununa, tí tinglýst er skylda um ¼ gjald til kommununa, á ognina.

Tey vísa á, at Kommunan/Landsverk/ og Eigararnir í 1991, hava gjørt avtalu um, at frábýti til landsvegin gjøgnum teirra ogn, svarandi til umleið ¼ av samlaða grundøkinum, skuldi kompensera fyri kvartsgjaldinum.

**Niðurstøða.**
Kommunan finnur ikki avtaluna í málinum, men fyriliggur ein tílík avtala við eigararnar av grannaognini matr. nr. 1094.

Víst verður annars til notat í málinum 2007–1050/4.

Tað kann viðmerkjast, at talan er ikki um at kommunan avskrivar sær rættin til kvartsgjald, men hevur kommunan í hesum føri fingið kvartsgjald, vísandi til at kommunan hevur fingið lendi til vegin sum samsvarar umleið ¼ av ognini.

**Tilmæli:**
Vísandi til at kommunan hevur fingið lendi til veg sum svarar til umleið ¼ av lendinum, og vísandi til at kommunan hevur gjørt somu avtalu við eigararnar av grannaognini matr. nr. 1094, Tórshavn, mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, til at strika ásetingina um kvartsgjald til kommununa á matr. nr. 1091, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**181/12** **<u>2010-0349 (sí j. nr 2011-1424)  RFP</u>**

**<u>Kloakk: Vestara bryggja  - Álaker</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ì sambandi við ” Reinsan av vestaru vág ” vantar nú at kloakkin frá fiskavirkinum verður førd út á opnan sjógv. Ì hesum sambandi hevur Tórshavnar havn latið gjørt eina kanning av viðurskiftunum á økinum á vestaru bryggju.

Saman við arbeiðinum á havnaøkinum, sum Tórshavnar havn stendur fyri, kundi hetta kloakkarbeiðið, ið fevnir um leggjan av kloakkleiðing út á streymasjógv frá Álakeri, verið gjørt í samstarvi við Tórshavnar havn.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 300.000,00 til projektering og kanningararbeiði og at P/F Martin E. Leo hevur projekteringina um hendi. Teir hava gjørt kanningina fyri Tórshavnar havn.

Kanningararbeiðið skal útgreina kostnaðarmeting av teknisku loysnina at leggja eina høvuðskloakkleiðing út frá fyrrverandi roykivirkinum út á streymasjógv.

Harumframt skal ein møgulig umlegging av verandi høvuðskloakkleiðing, ið liggur fram við nýggja hospitalsbygningin hjá Landssjúkrahúsinum.

Umsitingin kunnar um kloakkætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at farið verður undir arbeiðið, og at hetta verður fíggjað av íløgum fyri kloakkir í 2010.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 300.000,- av undirkonto 6875, íløgur í kloakkir.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyt:**
Projekt er komið frá Martin E. Leo, og er hetta gjørt í samstarvi við plan- og rakstrardeildina og Tórshavnar havn, sum í felag standa fyri útbjóðingini.

Umsitingin leggur fram uppskotið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna framlagda uppskotið og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Parturin hjá Tórshavnar havn.**
Arbeiðið hevur verið boðið út saman arbeiðinum hjá Tórshavnar kommunu.

Licitatiónin varð hildin 19. mai 2011:
Inn komu 3 tilboð.

| | |
|---|---|
| P/F Hansen og Jacobsen | 1.426.034 |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | 1.718.013 |
| Sp/f Plan v/Jóhannis Hellisdal | 1.979.760 |

Kostnaðurin fyri projektering, eftirlit, trygging, príshækkingar, byggiánaraveiting og óvæntað er mettur til kr. 400.000,-.

Í tilmælinum frá Martin E. Leo verður mælt til at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Hansen og Jakobsen upp á kr. 1.426.034,-.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Hansen og Jakobsen upp á kr.1.426.034,-
At avseta kr. 400.000,- til projektering, eftirlit, trygging, príshækkingar, byggiánaraveiting og óvæntað.
At játta kr.1.826.034,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2011 til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Havnarnevndin 24. mai 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Parturin hjá teknisku deild.**
Endaligt projekt er gjørt hjá Martin E. Leo, og varð lisitatión hildin á skrivstovuni hjá Martin E. Leo 19. mai 2011, kl. 11.00, og vórðu úrslitini hesi, sí skjal nr. 2010-0349/6.

Tilboðini eru kannað, og verður mælt til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá P/f Hansen & Jacobsen álj. 3.572.629,- (umvg).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá P/f Hansen & Jacobsen álj. 3.572.692,- og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og teknisku nevnd.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Játtaðar vóru í 2011 kr. 4.500.000,- til arbeiðið at gera kloakkleiðing í Vestaru bryggju, Álaker. Arbeiðið er nú liðugt og vísir roknskapurin eina meirnýtslu á kr. 449.000,-. Sostatt hevur samlaða arbeiðið kosta kr. kr. 4.979.000,-. Orsøkin til meirnýtsluna er, at grevstrararbeiðið í J.C. Svaboes gøtu var meiri umfatandi enn upprunaliga mett. Harumframt var arbeiðið at dagføra gongubreyt og asfaltarbeiðið víðkað og dýrkað. Arbeiðið var seinkað uml. 1 mánaða og kemst hetta av, at veðrið í tíðarskeiðinum 2011-2012 hevur verið stak vánaligt.

**Tilmæli:**
Leiðarin á plan- og rakstrardeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla til at loka málið og at fíggja undirskotið álj. - kr. 449.000,- av §6, deild 6875, iløgur kloakkir 2012 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. juni 2012:** Ronald Poulsen, málsviðgeri, kunnaði um málið. Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at undirskotið, ið skal fíggjast av § 6, deild 6875, íløgur kloakkir 2012, er kr. 480.000,-.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

182/12 **2008-3944 (sí eisini mál nr 2011-1045) RFP**

**Kloakk fram við Hoydalsá, stig 1**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vísandi til ætlanina fyri kloakkarbeiði í 2008, er ætlanin at fara undir ovara partin á stig 1, ið umfatar kloakkina frá Petur Nolsøe og oman til Vegin Langa.

Biðið verður um at Sp/f Matin E. Leo, sum hevur gjørt kanningararbeiðið og skitsuprojekt, heldur fram við projektering og útbjóðing av nevnda arbeiði. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión í oktober 2008.

**Fíggjarviðurskifti:**
Sambært fíggjarætlan fyri kloakkarbeiði í 2008 eru avsettar kr. 2.800.000,- til nevnda arbeiði. Umsitingin hevur saman við ráðgeva lati gera eina kostnaðarmeting 2008-3944/2. Kostnaðurin fyri kloakk arbeiðið er innan ásettu fíggjarkarmarnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað verður kr. 400.000,- til projektering og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við teknsiku nevnd, peningur til projektering verður lagdur út av teknisku umsitingini av øðrum projektum og endaliga samtykt í 2009.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Projekt, ið er gjørt fyri alt økið kring Hoydalsá sambært býráðssamtykt 20. oktober 2008, er nú klárt til útbjóðing. Í sambandi við at hetta projektið umfatar allar dálkingarkeldur fram við Hoydalsá, eru eisini tey summarhús, ið ikki hava byggiloyvi til heilársbúk fevnd av projektinum. Spurningurin um kommunan við at leggja kloakkleiðing til nevndu summarhús fer at legalisera ólógliga bygging í økinum fram við Hoydalsá er reistur og støða skal tí takast til um kloakkarbeiðið bert skal umfata dálkingarkeldur, ið standast av lógligari bygging ella um allar dálkingarkeldur yvirhøvur sambært ásetingum í galdandi umhvørvisreglum skulu veitast í skipaða kloakk.

Víst verður í hesum sambandi m.a. til kunngerð nr. 53. frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, kap. 7, §19, ið ásetir, at: .. '*Einki, ið kann dálka vatnið, má verða leitt í áir, løkir, vøtn, strond ella føroyskt sjóøki ella goymast so nær teimum, at vandi er fyri at tað kann skolast út í tey'.*

Víst verður eisini á §21, ið ásetir, at ..'*Ikki er loyvt at leiða spillivatn úr rottanga ella reinsiverki út í opna veit ella rennu nær almennum fjølgongdum vegi. Spillvatnið skal ganga í lokaðum rør, annaðhvørt beinleiðis á sjógv eftir loyvi frá bý- ella bygdarráð, sum skal vera í samsvari við herildarætlanina eftir §18 í løgtingslóg um umvhørvisvernd, ella í eina spillivatnsleiðing, sum bý- ella bygdarráð hevur góðkent....'*

Víðari í somu grein verður ásett, í stk 2, at '..*Hevur bý- ella bygdarráð lagt ella fer tað at leggja spillvatnsleiðng, hava eigarar av lendi, sum liggur nærhendis, fyri egna rokning skyldu til at leiða egið spillivatn til felags spillivatnsleiðingina, og kann bý- ella bygdarráð áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.*

Umsitingin hevur tískil latið gera alternativt uppskot, ið 'bert' tekur atlit at knýta tað 'lógliga' virksemið til kloakkskipanina.

Teknisku faknevndirnar mugu tí taka støðu til tann prinsippiella partin í málinum – um

1. farast skal víðari við upprunaliga projektinum, ið tekur atlit til at reinska alla Hoydalsá.

ella um

2. farast skal undir at arbeiða við eini projekti, sum einans tekur hædd fyri teimum dálkingarkeldum, ið standast av lógligari bygging í økinum kring Hoydalsá.

**Fíggjarlig viðvurskifti:**
Sambært metingum frá ráðgeva hevur umsitingin mett um kostnaðin fyri omanfyri nevndu projekt. Samlaða kostnaðarmeting fyri upprunaliga projektinum er uml. kr. 3.222.590,00 (sí skjal nr. 2008-3944/4) meðan samlaða kostnaðarmetingin fyri

alternativa projekti er uml. 2.337.846,- kr. (sí skjal nr. 2008-3944/5). Sambært skjali nr. 2009-2360/6 eru uml. kr. 7,8 mió. kr. tøkar til kloakkverkætlanir.

**Ískoyti:**
Í samband við kloakkætlan býráðsins, sum tað hevur verið arbeitt miðvíst við nú í nøkur ár, hava nakrir prinsipiellir spurningar tikið seg upp í samband við j. nr. 2008-3944 – Kloakk fram við Hoydalsá, stig 1. Hesir eru viðgjørdir á felagsfundi millum umsitingina og formannskapin í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Løgdeildin hevur gjørt løgfrøðiligt upprit við støðið í spurningum í notati frá 11.01.11 frá teknisku umsitingini um viðurskiftini viðv. Niðurstøðan í løgfrøðiliga uppritinum er, at bygging, ið útleiðir spillivatn, skal burturleiðast sambært kommunalu spillivatnsætlanini – líkamikið hvørt talan er um lógliga ella ólógliga bygging. Tað kann ikki metast sum legaliserandi av ólógligari bygging, um spillivatn frá hesari bygging verður íbundið spillivatnsskipan. Kommunan eigur at halda tingini sundur, soleiðis, at spillivatnstrupulleikarnir verða handhevjaðir eftir lógarverki viðv. umhvørvis- og spillivatni og ikki lógarásetingum í tilknýti til hvørt bygging er lóglig ella ikki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at fara undir arbeiði sambært upprunaliga prosjektinum, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið at játta 3,3 mió kr.av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2011 (j. nr 2009-0427). Somuleiðis verður mælt til at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2011:** Ein meiriluti: Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen og Sjúrður Olsen, samtykti at taka undir við alternativa uppskotinum, ið var mett til uml. 2.337.846,- kr. (smb. skjal nr. 2008-3944/5) og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Somuleiðis samtykti merilutin at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi.

Ein samd nevnd samtykti eisini at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at taka støðu til tað virksemi i økinum, ið ikki lýkur treytirnar í byggisamtyktini.

Samtykt var eisini at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina til kunningar.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og játta kr. 2.337.846 av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2011.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatiónin varð hildin hjá P/F Martin E. Leo 12. apríl 2011, kl. 11.00, og hevði P/f Plan v/Jóhannes Hellisdal lægsta tilboðið uppá kr. 1.085.745,00 u/mvg. Sí skjal nr. 2008-3944/18.

**Fíggjarviðurskiti:**
Áður játtað til projektering og uppmáting er kr. 400.000 og er tað av íløgujáttanini 2010/2011, ið er uml. 7,4 mió. kr.

**Ískoyti:** Málið varð sent til kunningar í heilsu og umhvørvisnevndin, smb. teldubrævið frá umsitingini 11. mars 2011.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Plan v/Jóhannes Hellisdal og at játta pening til verkætlanina sambært skjali nr. 2011-1045/1 og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at taka av tilboðnum frá P/f Plan v/Jóhannes Hellisdal á kr. 1.085.745,00 og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 1.410.000,00 av íløgum í kloakkir konto 6875.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá P/F Plan v/Jóhannes Hellisdal.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur upprunaliga játtað kr. 2.338.000 til verkætlanina. Seinni eru kr. 119.000 fluttar til aðra verkætlan. Netto eru sostatt játtaðar kr. 2.219.000.

Neyðuga játtanin var kr. 1.410.000. Samtykta játtanin er sostatt kr. 809.000 ov høg. Biðið verður um, at hon verður lækkað við somu upphædd. Upphæddin er flutt til aðra verkætlan.

**Tilmæli:**
Fíggjarleiðarin mælir fíggjarnevndini til at lækka játtanina 809.000 kr.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Játtaðar vóru í 2011 kr. 1.410.000,- til arbeiðið at gera kloakkleiðing fram við Hoydalsá, stig 1. Arbeiðið er nú liðugt og eftir standa sambært roknskapinum kr. 23.000,-. Sostatt hevur samlaða arbeiðið kosta kr. 1.387.000,-. Arbeiðið var liðugt innanfyri ásettu tíðarætlanina.

**Tilmæli:**
Leiðarin á plan- og rakstrardeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla til at loka málið og at flyta avlopið álj. kr. 23.000,- til §6, deild 6875, iløgur kloakkir 2012 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. juni 2012:** Ronald Poulsen, málsviðgeri, kunnaði um málið. Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**183/12** **<u>2010-2930 (sí j.nr. 2011-1430 og 2010-1718) RFP</u>**

**<u>Kloakk frá Frítíðarskúlanun og rossafjósunum í Havnadali</u>**

**Lýsing av málinum, samandráttur:**
Sambært samtykt í fíggjarnevndini 9. september 2010, j.nr. 2010-1718, hevur umsitingin latið gera uppskot til heildarloysn fyri frárensl frá bygningum á økinum.

Víst verður til kunngerð nr. 90 frá 28 sept. 2007, kap. 7 § 19, ið ásetir at: „ ´Einki, tað kann skolast út í tey. "

Ì hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan boðað frá, at í seinasta lagi 1. januar 2015 skulu allar kloakkskipanir hjá kommununum lúka hesar ásettu treytir.

Staðfest er, at økið í Havnadali ikki lýkur hesar treytir. Har ein frítíðarskúli, hestafjós v.m. lata sínar kloakkir renna út í Tvørá. Hetta má fáast í rættlag og verður biðið um kr. 250.000 til uppmátingar og projektering av hesum arbeiði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin av plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í mentamálanevndina til útvegan av fígging til projektering.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at beina málið aftur í tekniska nevnd við atliti til at ávísa fígging til arbeiðið.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin hevur ikki sett pening av til planlegging av projektering av kloakk arbeiðum innan játtaðum fíggjarkarmum. Sambært umhvørvisslógini er tað álagt kommununi at gera neyðug atlit fyri ikki at dálka umhvørvið.

Sambært uppriti frá løgdeildini um spurningin viðv. kloakering við atliti frá ólógligari bygging, verður m.a. vís á, at:

*Endamálið við umhvørvislógini (og kunngerðunum, ið eru heimilaðar í umhvørvislógini) er at tryggja, at spillivatn verður burturleitt á ein skipaðan hátt og at fyribyrgja umhvørvisdálking og heilsuvanda. Eftir, at kommunan hevur gjørt eina heildarætlan, sum er góðkend av landsstýrismanninum, kann kommunan venda sær til ymisku húsaeigararnar og heita á tey, um at fylgja ásetingunum í kloakætlanini, við tilvísing til heimildina §§ 14 og 21. Stk. 2, í kunngerð um umhvørvisreglur, eru soljóðandi:*
***§ 21.*** *[2] (Sett úr gildi).*
*Stk. 2. Hevur bý- ella bygda(r)ráðið lagt ella fer tað at leggja spillvatnsleiðing, hava eigarar av lendi, sum liggur nærindis, fyri egna rokning skyldu til at leiða egið spillvatn til felags spillvatnsleiðingina, og kann bý- ella bygda(r)ráðið áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.*
***§ 14. Spillvatn.*** *Grundeigari hevur skyldu til at bera so í bandi, at spillvatn ikki setur inn á annan mans grund. Um so er, skal hann fyri egna rokning bøta um amparnar, og kann bý- ella bygda(r)ráðið áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi*
*Sambært § 2, stk. 1 nr. 3 í kunngerð um spillivatn er spillivatn allýst sum : vatn, sum á einhvønn hátt er dálkað, og sum ikki kann roknast sum regnvatn.*
*Umhvørvislógin tekur ikki hædd fyri hvørja bygging talan er um – t.v.s. hvørt tað er lógligt ella ólóglig bygging. Útgangspunktið er, at har spillivant verður útleitt, skal tað leiðast burtur á skipaðan hátt.*
*Í mun til ásetingarnar í § 8 "Kunngerð nr. 111 frá 7. September 2009 um spillivatn", ið er soljóðandi:*
***§ 2*** *Kunngerðin fevnir um kommnunalu ábyrgdina at burturleiða spillivatn frá húsarhaldum, virkjum, festum økjum o.ø. sambært góðkendari spillivatnsætlan"*
*og § 18 " Løgtingslóg um umhvørvisvernd", ið er soljóðandi:*
***§ 18.*** *Kommunan skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillvatnið í kommununi skal fáast burtur.*

*er greitt, at kommunan er myndugleikin, ið skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillivatnið í kommununi skal fáast burtur.*

Verður hugt nærri at tí virksemi, ið er úti á økinum kring fjósini í Havnardali, er talan um virksemi, sum ikki hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd ella heilsu- og umhvørvisnevndini – við atliti til vegaatkomu og umhvørvið. Hetta virksemið er sett í verk, uttan tað á nøktandi hátt eru tikin neyðug atlit til tey teknisku og umhvørvisligu viðurskiftini. Her er tíverri ikki gjørdur nakar vegur við hartilhoyrandi veitingum sum vatn og ljós, og heldur ikki er nøkur skipað góðkend kloakkleiðing gjørd.

Skal tekniska nevndin hava ábyrgd av at fáa rættað upp á verkætlanir, ið eru settar í gongd av øðrum nevndum, má tekniska nevndin fáa tær neyðugu játtanir til júst hetta endamálið. Skal fígging hinvegin fáast til vega innan ásettu fíggjarkarmum hjá teknisku nevnd, eru útlit fyri at onnur arbeiði, ið nevdin umsitir, eftirfylgjandi mugu bíða ella útsetast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin ávísir fígging til projektering og kostnaðarmeting, upp til kr. 250.000, av íløgujáttanini til kloakkir í 2011, og at arbeiðið verður raðfest á íløguætlanini fyri 2011 og møgulig restfígging av íløguætlanini fyri 2012. Somuleiðis verður mælt til at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Málið verður beint í heilsu- og umhvørvisnevndina til kunningar.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at játta kr. 250.000 kr. av íløgujáttanini til kloakkir í 2011 til projektering og kostnaðarmeting.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Endaligt projekt er gjørt av P/f Pb Consult og var boðið út í innbodnari lisitatión, sum var hildin á skrivstovuni hjá Pb Consult tann 3. juni, kl. 14.00.
Úrslitini vóru hesi, sí skjal nr. 2010-2930/11.

Tilboðini eru kannað og mælt verður til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur P/f v/Frank Hellisdal

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og í øðrum lagi alternativ I, álj. 1.100.680.- og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Útsett.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at ávísa restfígging.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið, og at verkætlanin verður fíggja sambært mál nr. 2011-1430.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndn 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og fíggja sambært mál 2011-1430.

**Býráðið 23. juni 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera kloakkleiðing frá frítíðarskúlanun og rossafjósunum í Havnadali til íbindingina við Norðasta Horn er nú liðugt og eftir standa sambært leiðslukunningini kr. 192.000,-. Játtaðar vóru 24. mars 2011 kr. 250.000,- og 23. juni 2011 kr. 809.000,- og 365.000,- ella samanlagt kr. 1.424.000,-. Sostatt hevur samlaða arbeiðið kosta kr. 1.232.000,-.
Arbeiðið var seinkað uml. 1 mánaða, og kemst hetta av, at veðrið í tíðarskeiðinum 2011-2012 hevur verið stak vánaligt.

**Tilmæli:**
Leiðarin á plan- og rakstrardeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla til at loka málið, og at flyta avlopið álj. kr. 192.000,- til §6, deild 6875, íløgur kloakkir 2012 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. juni 2012:** Ronald Poulsen, málsviðgeri, kunnaði um málið. Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir vil teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**184/12** **2012-0328**

**Klæðing av saltsølu bygninginum á matr. nr. 970e og Bacalao bygningunum á matr. nr. 970c og 970d.**

**Saltsølu bygningurin á matr. nr. 970e.**
Tórshavnar havn keypti bygningin í 1994. Grundarealið er 1.765 m2, og tann samlaða gólvvíddin er um 6.000 m2 í 5 hæddum, við undantak av sjálvari saltsiloini.

Bygningurin stendur í 3. grundumráði, og er umráðisparturin lagdur av til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap, og til virksemi, ið hava samband við hesi.

Bygningurin verður nú útleigaður til goymslu, rágevarar, verkstøð o.a. Fram til summarið 2011 leigaði M.J.Saltsøla siloina, tá teir valdu at flyta á annað stað.

Partar av bygninginum eru í so vánaligu standi, at tað ber ikki til at leiga út.

Um bygningurin skal kunna brúkast framyvir, er neyðugt at skifta vindeygu og hurðar og at bjálva og klaga allan bygningin. Hetta arbeiðið skal gerast soleiðis, at bygningurin skal kunna brúkast til ymisk vinnuendamál.

Tá bygningurin er klæddur, er møguligt at inrætta bygningin eftir tørvi, tó eftir einum leisti, har støða er tikin til felags fasilitetir og bruna teknisk krøv.

Selmar Nilsen arkitektur stóð fyri at skráseta bygningin í 2006.

**Bacalao bygningarnir á matr. nr. 970c og 970d:**
Tórshavnar havn keypti bygningarnar á vári í 2011. Talan er um tveir bygningar við einum samlaðum grundarealið upp á 4.300 m2 og einari samlaðari gólvvídd upp á 12.400 m².

Stórur partur av bygningunum verða brúktir til landing af feskum fiski, frostgoymslu og meirvirking av fiski. Ein annar partur av bygninginum kann brúkast til skrivstovuvirksemi, goymslu ella annað.

Tøkini er nýggj, men partar av vindeygum og hurðum má skiftast.

Bygningarnir, sum eru úr betong, brúka nógvan hita, og neyðugt er tí at bjálva og klæða, so bygningarnir kunnu blíva heitir og turrir.

Miðja verður eftir at bjóða arbeiðið út áðrenn summarfrítíðina 2012.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at arbeiða víðari við einum uppskoti til at klæða bygningarnar. Arbeiðið at fyrireika uppskotið verður fíggjað av rakstri.

**Havnarnevndin 13. februar 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

Skitsuuppskot er gjørt.

**Saltsølubygningurin:**
Bygningurin er bygdur í fleiri stigum, og sæst hetta afur í fasaduni á bygninginum. Í uppskotinum verður bygningurin strammaður upp, so hann nú er meira ein heild.

Allur bygningurin verður klæddur av nýggjum við nýggjum hurðum og vindeygum.

**Bacalao bygningarnir:**
Í fyrsta umfari er ætlanin at klæða suðursíðurnar á báðum bygningunum, tær sum venda móti sjónum.

Uppskotið leggur upp til at styrkja verðandi identitet.

Samlaður kostnaður fyri klæðing av Saltsølubygninginum og Bacalao er mettur til 20 mió. kr., sum skal fíggjast av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2012.

Kostnaður fyri projektering er 1.1 mió.kr.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
at taka undir við skitsuuppskotinum
at játta kr. 1.060.000,- til projektering
at bjóða arbeiðið út.

**Havnarnevndin 19. mars 2012:** Samtykt at taka undir við skitsuuppskotinum. Eisini samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játta 1,1 mió kr til projektering og at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini játta 1,1 mió kr til projektering og at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari licitatión, sum varð hildin tann 7. juni 2012.
Arbeiðið hevur verið boðið út í tveimum enterprisum, at klæða saltsølubygningin og at klæða Bacalao

**Saltsølubygningurin:**
Húsavarðatænastan 10.679.508
Articon 10.885.707
TG Verk 10.956.011
ÁTS 12.867.708
J&K Petersen 18.500.175

**Bacalao:**
Articon 2.842.587
Húsavarðatænastan 3.327.739
TG Verk 3.378.552
Búsetur 5.712.456
ÁTS 4.144.212
J&K Petersen 5.927.020

Viðmerkingar frá Articon: Um tikið verður av báðum tilboðunum, verður veittur ein samlaður avsláttur upp á kr. 200.000,- .

Partar av útveggunum verða tiknir burtur og settir í av nýggjum, hetta gerð, at nakað av arbeiði verður av hita- og øðrum instalatiónum. Hetta arbeiðið er ikki boðið út, men er mett at kosta kr. 846.000,- og verður bjóðað út ein av fyrstu døgunum.

Tá tað nú blívur klætt verður tað kanska neyðugt at styrkja fundamentir og kontruktiónir í fasaduni. Hetta er mett at kosta kr. 1.000.000,- .

Í tilmælinum frá SNA verður mælt til at taka av lægsta tilboðnum frá:
Húsavarðatænastuni uppá Saltsølubygningin kr. 10.679.508,-
Atrticon uppá Bacalao kr. 2.842.587,-

SNA kann standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 1.140.000,- .

Kostnaður fyri trygging, príshækkingar, flyting av verðandi skrivstovum og óvantað er mettur til kr. 3.000.000,- .

Kostnaður fyri projektering er kr. 1.100.000- og er áður játtað av býráðnum .

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at
- avseta kr. 846.000,- til hita og aðrar instalatiónir, og at bjóða arbeiðið út.
- avseta til konstruktiv viðurskiftir kr.1.000.000,-
- at taka av lægstu tilboðunum frá Húsavarðatænastuni uppá kr. 10.679.508,- og frá Articon uppá kr. 2.842.587,-
- at taka av tilboðnum fra SNA at standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti kr. 1.140.000,-
- at avseta kr. 3.000.000,- til trygging, príshækkingar, flyting av verðandi skrivstovum og óvantað.
- at játta kr.20.608.095,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2012 og 2013, til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Havnarnevndin 18. juni 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina
málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**185/12** **<u>2009-2549 BAM</u>**

**<u>Kommunala Brennistøðin: Endurnýggjan av ketlinum.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ketilin á KB er frá 1987, og er nú sostatt umleið 22 ára gamal. Partar av ketlinum vórðu skiftir í 1989, vegna framleiðslufeil. Livitíðin á einum ketli er natúrliga avmarkað, tó uttan at til ber við vissu at siga, hvussu long livitíðin er.

Í 2006 varð ovnurin høvðusumvældur, eins og framkomin roykreinsiskipan varð bygd. Ímillum hesar báðar høvðuspartar er triði høvuðspartur í annlegginum, nemliga ketilin, sum einki varð gjørt við í.s.v. høvuðsumvælingina.

**Grundarlag og uppgávulýsing**
KB hevur seinastu árini gjørt kanningar og metingar fyri at kunna finna fram til røttu loysnina og røttu løtuna at endurnýggja ketilin. Grundarlagið ella fortreytirnar fyri kanningunum og metingunum eru hesar "uppgávulýsingar":

- At aldur og slit á ketlinum viðføra:
  - Rakstrarsteðgir vegna umvælingar, sum minka um tøka brennitíð
  - Brenniorkan minkar, tá ið rør verða proppað vegna lekar
  - Um illa vil til, kunnu álvarsamir feilir leggja annleggið lamið í longri tíð
- At tekniskir trupulleikar eru við rakstrinum av filtrinum, vegna ov høgan hita á roykinum úr ketlinum.
- At núverandi ketil krevur manuella reinsing umleið 10. hvønn dag. Hetta ber til, við niðursettari last, men minkar um brennitíðina og harvið mongdina, sum kann brennast.
- At annleggið verður fyrireikað tekniskt og í mun til brenniorku til eina hóskandi restlivitíð, soleiðis at gjørdar íløgur í ovn og filtur verða gagnnýttar sum longst.

<u>Viðv. 1: Aldur og slit.</u>
Seinastu árini eru hesar uttanhýsis kanningar av ketlinum gjørdar (j.nr. 2009-2549/1):

- 2004: Babcock & Wilcox Vølund : Tilstandsrapport
- 2006: Force Technology: Ultrasonic Thickness Examinination (IRIS)
- 2008: Babcock & Wilcox Vølund : Inspektions- og tykkelsesmålerapport

Kanningin frá 2004 vísti, at ketilin sum heild er í góðum standi, men at innanfyri eitt tíðarskeið á uml 6 ár kann roknast við at rørini skulu skiftast.

Í kanningin frá 2006 varð tjúktin á rørunum máld við stikkroyndum (54 av 414 rørum). Minst málda rørtjúkd var 2,8 mm.

Í kanningini frá 2008 vórðu eisini gjørdar tjúkdarmátingar (stikkroyndir), og minst málda rørtjúkd var 2,8 mm. BWV metti tá, at ketilin var í sera góðum standi, og at vænta, at ketilin kann vera í rakstri í nøkur ár aftrat (einki áramál "garanterað"!). Mett varð, at neyðugt er ikki at skifta rørini í løtuni.

Seinastu árini hava nakrir lekar verið á ketlinum. Serliga seinasta árið hava fleir lekar verið. Hesir lekar benda á, at livitíðin nú er avmarkað til rættiliga fá ár aftrat. Tað serliga við slíkum trupulleikum við eldri ketlum, ið byrja at leka er, at lekar koma títtari og títtari fyri, og bráddliga kann støðan gerast álvarsom.

Kommunala Brennistøðin hevur heitt á Rambøll um, við støði í gjørdu kanningunum, at meta um støðuna og livitíðina hjá ketlinum (j.nr. 2005-2549/9). Teirra niðurstøða er, at livitíðin er fá ár, og at 5 ár ikki kunnu garanterast.

Tekniski leiðarin og rakstrarleiðarin á KB hava sjálvsagt eisini loypandi mett um støðuna á ketlinum, sí frágreiðing tekniska leiðarans (j.nr. 2009-2549/10). Teirra

meting og niðurstøða er, at livitíðin er avmarkað til 3-5 ár aftrat, og at renovering má vera byrjað innan 3 ár. Í frágreiðingini verður eisini sagt, at 2% av rørunum eru proppað vegna lekar, umframt at aðrir lekar hava verið. Proppaðu rørini viðføra minni kapacitet á ketlinum, hægri roykhita, sum aftur gevur trupulleikar í filtrinum.

Viðv.2: Tekniskir trupulleikar við rakstrinum av filtrinum
Hitin á roykinum frá ketlinum er í hægra lagi, í mun til raksturin av roykreinsiskipanini. Neyðugt er at sproyta nógv vatn inn í roykin fyri at køla, og tað vísir seg at vera sera trupult tekniskt at fáa hetta at rigga nóg væl. Úrslitið gerst, at øska byggist upp í konditioneringstorninum, sum at enda kann loypa niður og steingja fyri roykrásini, og tað er ein sera álvarsom støða, tí heitu roykgassini sleppa ikki burtur vanliga vegin, men mugu út gjøgnum op o.t. í ovninum.

Hetta viðførir

- Rakstrarsteðg (mist brennitíð)
- Yvirupphiting av ketli og ovni, sum aftur er orsøk til at ketilin verður termiskt belastaður og harvið slítist meira
- Dálking av ovnhøll og filturhøll
  Fyri at loysa hendan trupulleika er neyðugt at lækka hitan á roykinum frá ketlinum, og tað kann gerast antin við einum størri ketli ella við einum "economisara" millum ketilin og filtrið.

Viðv. 4:
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini heldur, at rættast er at gagnnýta gjørdu íløgurnar í 2006 sum longst, áðrenn eitt heilt nýtt annlegg verður bygt. Í hesum sambandi eru tvey ymisk tíðarskeið (planperiodur) mett, eitt stutt (5-10 ár) og eitt longri (12-18 ár). Væntast kann, at nøgdirnar at brenna økjast líðandi við tíðini, og tí er neyðugt at fremja tiltøk, sum kunnu økja um brenniorkuna, fyri at kunna nøkta tørvin, sum verður mettur til minst 20.000 T/ár í longra tíðarskeiðnum. Somuleiðis er væntandi, at brennivirðið økist komandi árini, og ávirkar hetta brenniorkuna negativt.

**Loysnir**
Kommunala Brennistøðin hevur í samráð við Rambøll biðið veitaran av annlegginum Babcock & Wilcox Vølund um at koma við uppskotum til loysnir og kostnaðarmetingum uppá áður nevndu "uppgávulýsingar". Rambøll hevur síðani mett um hesi uppskot og skrivað eitt notat við tilmæli um hvørja loysn Rambøll metir vera ta bestu.

Uppskotini til loysn eru hesi (sí uppskotini í síni heildí málinum, j.nr. nevnd niðanfyri, eins og meting hjá Rambøll, j.nr. 2009-2549/9):

- **Renovering av verandi ketli** (útskifting av roykrørum), j.nr. 2009-2549/3:
  *Uppskot 1 er einans ein stuttskygd høvuðsumvæling av ketlinum (styttra tíðarskeiðið, 10 ár), men loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, ella við manuellu reinsingini av rørunum. Partar av ketlinum verða ikki skiftir, og er tí framvegis eins gamal og áður. Loysnin gevur ikki øktan kapacitet. Við hækkandi brennivirði kann væntast, at brenniorkan fellur til 15.000 T/ár. Orkuframleiðslan verður ikki økt.*
  *Kostnaðarmeting: 2,0 mió. (Rambøll).*

- **Innseta Economisara millum ketil og filtur**, j.nr. 2009-2549/6:
  *Uppskot 2 loysir trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, umframt tað sum er nevnt undir uppskot 1. Brenniorkan kann við hesi loysn økjast við 1000 T/ár. Orkuframleiðslan verður økt umleið 10-15 %.*
  *Kostnaðarmeting: 7,5 mió, íroknað uppskot 1, renovering av ketli. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu**, j.nr. 2009-2549/4:
  *Uppskot 3 loysir trupulleikan við ov høgum roykhita til filtrið, men ikki manuellu reinsingina av rørum. Allur ketilin verður skiftur. Brenniorkan verður økt til 20-22.000 T/ár, sjálvt við hækkandi brennivirði. Orkuframleiðslan verður økt 10-15%. Loysnin kann nýtast til longra tíðarskeiðið.*
  *Kostnaðarmeting: 10,0 mió. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan vatnrørsketil**, j.nr. 2009-2549/5:
  *Uppskot 4 loysir nevndu trupulleikar við ov høgum roykhita til filtri og manuellu reinsingini av ketlinum. Brenniorkan kann økjast til 24.000 T um árið. Orkuframleiðslan verður økt. Við 10% størri íløgu kann Brenniorkan økjast til 30.000 T, um ovnurin seinni verður um- og útbygdur. Kostnaðarmeting: 30.0-35.0 mió. (Rambøll).*

**Niðurstøða og tilmæli hjá Rambøll:**
Rambøll mælir til, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) verður vald. Hendan loysnin lýkur krøvini til brenniorkutørv í longru planperioduni (12-18 ár), eins og hendan loysnin loysir mest átrokandi trupulleikan við ov høgum hita til filtrið.

**Meting og niðurstøða hjá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.**

| Loysn | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| 1 | - Lágur kostnaður<br>- Stutt umbyggingartíð (2-3 vikur) | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Økir ikki um brenniorkuna.<br>- Økir ikki um |

| | | |
|---|---|---|
| | | orkuframleiðsluna.<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna |
| 2 | - Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist (eitt sindur)<br>- Orkuframleiðslan økist eitt sindur (FHF)<br>- Stutt umbyggingartíð (3-4 vikur) | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna<br>- Ein eyka partur, sum ikki er kendur frammanundan, skal byggjast inn í skipanina.<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 3 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist<br>- Orkuframleiðslan økist (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 4 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Ikki neyðugt við manuellari reinsing<br>- Brenniorkan økist nógv<br>- Orkuframleiðslan økist nógv (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Kostnaðurin ov høgur í mun til nyttuna<br>- Ketilin er stórur (høgur) og krevur bygningsbroytingar<br>- Ketilin er torførari at reka, tí hann er meiri avanseraður. Umbyggingartíð 3-4 mánaðir.<br>- neyðugt við eyka kølikapaciteti |

Samanumtikið metir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) er nógv tann besta loysnin, sæð í mun til kostnaðin og nyttuna, tá talan um um bæði styttru og longru planperioduna.

Vísandi til, at livitíðin á ketlinum verður mett at vera avmarkað til 3, kanska 5 ár enn, mælir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at arbeiðið at endurnýggja ketilin eigur at vera gjørt í 2011. Tað er ikki rætt at bíða sum longst, grundað á hesi viðurskifti:

- vandi er fyri, at sum tíðin gongur, fer ketilin at leka meira, harvið koma rakstrarsteðgir, rør mugu proppast, og kapaciteturin fellur, og hitin hækkar til filtrið, sum fær enn størri trupulleikar
- Útskiftingin má ikki draga út, so at tað bráddliga gerst neyðugt at útskifta heil rørbunt ella øll rørini, beint frammanundan at ketilin skal útskiftast.
- Tað er best at fáa gjørt endurnýggjanina meðan rusknøgdirnar eru minst, og tað er í kreppútíðum, annars vaksa rusknøgdirnar gjarna fyri hvørt ár sum gongur.
- Ein nýggjur ketil heldur gjarna í umleið 20 ár, og verandi annlegg verður neyvan í rakstri longri enn tað, og fyri at gagnnýta ein nýggjan ketil mest møguligt, ræður um at fáa hann í rakstur sum skjótast.

Framleiðslutíðin av einum nýggjum ketli er umleið 6-8 mánaðir, harumframt kemur tíð til planlegging, sáttmálasamráðing við veitara o.t. á umleið 6 mánaðar, so samanlagt tekur verkætlanin umleið 1-1,5 ár at fremja.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at tikið verður undir við at uppskot nr. 3 (Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu) verður valt, og at útskiftingin verður gjørd í 2011. Samstundis verður mælt til, at nevndin tekur upp spurningin um fígging sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar, soleiðis at fyribils kr. 10,0 mió. u/mvg verða tøkar til útskifting av ketlinum í 2011.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina spurningin um fíggingina í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Umrøtt, og verður viðgjørt í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Ískoyti:**
Síðani málslýsing og tilmæli í hesum máli bleiv gjørt á heysti 2009, hevur brennistøðin á Bornholm, ið er nærum meinlík brennistøðini á Hjalla, havt útbóð og gjørt sáttmála um tekniska dagføring av støðini, herundir eisini ketlinum. Framleiðsla av nýggjum ketli til Bornholm er nú í gongd, og verður hann skiftur í september 2011.

Ráðgevi hjá BOFA var Rambøll, sum sostatt hevur nýggjar dagførdar upplýsingar viðvíkandi tekniskum loysnum og kostnaðum. Við støði í nýggju dagførdu upplýsingunum hevur Rambøll gjørt eina dagføring av notatinum frá september 2009, eins og nýtt tilmæli er gjørt, j.nr. 2009-2549-13.

Royndirnar frá útbjóðingini á Bornholm vísa at tann áður tilmælta loysn 3 er nú mett at kosta kr. 13 mió., í mun til áður mett kr. 10 mió.

Útbjóðingin vísti eisini, at at tað er gjørligt at fáa ein vatnrørsketil (loysn 4) fyri umleið kr. 16 mió., í mun til áður mett kr. 30-35 mió, og sum ikki krevur stórar bygningsbroytingar, sum áður hildið. Í fyrra notatinum var júst tikið fyrivarni fyri, at óvissan í.s.v. kostnaðurmetingin av hesi loysnini var størri enn viðvíkjandi hinum loysnunum, serliga tí loysnin varð mett at krevja bygningsbroytingar, og tí at neyðugt var við neyvum tilboðum frá veitarum av ketlum. Henda loysnin samsvarar einum nýmótans forbrenningsketli.

Grundað á hesar dagførdu upplýsingarnar, mælir Rambøll til, at velja loysn 4, sum er útskifting av ketlinum til ein vatnrørsketil, soleiðis sum gjørt er á Bornholm.

**Tilmæli:**
Grundað á nýggju upplýsingarnar í málinum, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini nevndini til at:

- Velja at fremja loysn 4, sum er útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil eins og gjørt er á Bornholm og
- Heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at raðfesta játtan á umleið kr. 16 mió. (u/mvg) til ketil, umframt umleið 0,5 mió. til ráðgeving á íløguætlanini, soleiðis at ketilin kann bíleggjast, skiftast og verða tikin í nýtslu innanfyri í mesta lagi 2 ár.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 0,5 mió. kr. av konto 7175, renovasjón (íløgur), til ráðgeving og útbjóðing.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmáli um heildarráðgeving, í sambandi við útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil, verður í næstum gjørdur við ráðgevarafyritøkuna Rambøll.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðini mæla, við grundarlagi í fylgiskjali 1 í ráðgevarasáttmálanum, j. nr. 2009-2549/18, til, at arbeiðið, at gera ketilin, verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
TK hevur móttikið 1. uppskot til útbjóðingartilfar uppá ketilin frá Rambøll, j.nr. 2009-2549/20. Samandráttur av útbjóðingartilfarinum og tilmæli frá Rambøll um útbjóðingarhátt og ketlaveitarar, verður sent limunum saman við skránni. Umsitingin hevur gjørt ymsar viðmerkingar til tilfarið, j.nr. 2009-2549/21.
Týdningarmestu høvuðstáttirnar í útbjóðingartilfarinum eru:

- Útbjóðingarháttur: Undirhondsboð sambært donsku "tilbudsinhentningsloven" (Løgdeildin er biðin um at kanna/viðmerkja løg-grundarlagið)
- Grundarlag fyri tillutan av ordra: "Det økonomisk mest fordelagtige tilbud" sambært donsku "tilbudsindhentningsloven".
- Metingarstøði undir "Det økonomisk mest fordelagtige tilbud":
  - Pris 60 Point
  - Teknisk kvalitet 30 Point
  - Tidsplan for færdiggørelse af leverancen 10 Point
  - Maksimum pointantal 100 Point
- Høvuðspunktir í uppksoti til tíðarætlan (kann samráðast um partar av tíðarætlan sambært útbjóðingartilfari):
  - 01/07-2012: Útbjóðingartilfarið sendast út
  - 31/08-2012: Tilboðsfreist
  - 01/11-2012: Undirskriva sáttmála
  - 15/07-22/09: Installatión / uppstart
  - 23/09-23/12: Royndarkoyring
  - 23/12-2013: Fyribils yvirtøka
- Uppskot til gjaldsætlan (kann samráðast sambært útbjóðingartilfari):
  - 1. rata (við ordra): 01/11-2012: 20% av sáttmálauppph.
  - 2 .rata (veitan av komponentum) 15/07-2013: 30% av sáttmálauppph.
  - 3 .rata (start royndarkoyring) 23/09-2013: 40% av sáttmálauppph.
  - 4. rata (fyribils yvirtøka) 23/12-2013: 10% av sáttmálauppph.

Umframt veitingina av ketlinum, sum ketlaveitarin skal veita sambært umrødda útbjóðingartilfari, verða aðrar neyðugar byggiharraveitingar umfataðar av samlaða projektinum: Byggiharraveitingarnar eru í høvuðsheitum:

- Niðurtøka av verandi vatnkøliskipan og tilhoyrandi útgerð (s.s. kølarum)
- Gera rørgrøv fyri rørum til Fjarhitafelagið
- Veitan og uppsetan av vatnrørum frá bygningi og yvir til Fjarhitafelagið (og retur)
- Gera fundamentir til nýggjar kølarar og rørberarar
- Inniloka verandi kølaraøki, sum verður neyðugt at nýta til maskinútgerð (leggja tak á, skera hol í betongvegg fyri dupulthurð inn til verandi

ketilrúm, seta hurðar og vindeygu í, og møguliga innbyggja hems/stáldekk við trappu)
- Møguliga nýtt trýstluftannlegg (sum eisini er optión í ketlaveitingini)
- Neyðugt verður helst eisini at gera nýggja El-innlegging til Jarnplássið, soleiðis at skrottpressan verður tikin av høvuðs el-talvuni á Brennistøðini, fyri at fáa nóg mikið av tøkum el-mátti á talvuna.

Til tess at kunna byrja fyrireikan av nøkrum av omanfyristandandi byggiharraveitingum, sum skulu samskipast við ketlaveitingina, hevur leiðslan á KB mett tað verið neyðugt at fáa gjørt visuellar skitsur av nýggju vatnkøliskipanini og tilhoyrandi útbúnaði (s.s. staðseting av kølarum, pumpum og kompressarum).

Skitsurnar verða ætlandi latnar ketlaveitarunum sum vegleiðing um, hvussu KB ynskir at køliskipan og komponentar verða staðsettir, og av tí at tær skuldu verða lidnar samstundis sum útbjóðingartilfarið, vóru ikki stundir at leggja mál um serstaka játtan fyri nevnd til støðutakan, áðrenn tær vóru bílagdar.
Skitsurnar eru gjørdar av Sofus M. Jacobsen, ráðgevandi verkfrøðingi, og vóru av SMJ mettar at kosta 40-50.000 kr. Leiðarin á KB metir ikki, at gerð av tílíkum visuellum skitsum eru partar av arbeiðnum hjá Rambøll, og tí verður biðið um at peningur verður játtaður til hetta arbeiðið av íløgum innan renovatiónsøkið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu brennistøðini mæla til at:

- góðkenna útbjóðingartilfarið við viðmerkingum, sum umsitingin ger
- bjóða veitingina av ketlinum út sambært tilmælta útbjóðingarháttinum og til teir veitarar, sum Rambøll mælir til
- góðkenna uppskot til tíðarætlan og gjaldsætlan og samstundis fyrireika úutvegan av neyðugari játtan til 1. ratugjald, sum er 20% av sáttmálaupphædd (upphæddin er ikki kend enn, tí tilboð fyriliggja ikki, men verður væntandi um 2-3 mió. kr.), sum skal gjaldast 1. november 2012.
- játta kr. 60.000 + mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.
- beina málið um fíggjarnevnd í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Bárður Michelsen, leiðari á kommunalu brennistøðini, kunnaði um útbjóðingartilgongdina.

Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Jan Christiansen og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 60.000 umframt mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**186/12** **<u>2006-0801 TÍH</u>**

**<u>Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin løgukonto 6575</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Niðanfyri eru arbeiðsuppgávur ætlan er at seta í verk í 2012

Leyslig meting.

- *Liðugtgerð av B3 (bíðar eftir ringvegnum) 600.000 kr
- Arbeiðsøkið og garður við gravarahúsið 400.000 kr
- Høvuðsumvæling av betongarði 360 m útv. 580.000 kr
- Eftirlit v.m. 200.000 kr

MVG 25 % av 1.78 mill 445.000 kr
Íalt 2.225.000 kr

| | | Framflutt frá 2011 | Játtan 2012 | Tøkt íalt |
|---|---|---|---|---|
| L00001 | Løgukarmur | | 1.000.000 | 1.000.000 |
| L00002 | Løgukarmur | 1.000.000 | | 1.000.000 |
| | Flutt til sjóarhita | | - 500.000 | - 500.000 |
| | Í Hoyvík | | 1.000.000 | 1.000.000 |
| L65003 | Í Kaldbak | 766.000 | | 766.000 |
| L65004 | Við Velbastaðvegin | 1.606.000 | | 1.606.000 |
| | | **3.372.000** | **1.500.000** | **4.872.000** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at býarskipanarnevndin samtykkir at skipa arbeiðið sum raðfest omanfyri, og at beina málið víðari til býráðið umvegis fíggjarnevndnina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Tikið av skrá.

**Býráðið 28. juni 2012:** Tikið av skrá.

**187/12** **2000-1326 TÍH**

**Mál viðv. nýggjum kirkjugarði í Kaldbak**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Áheitan frá Pálli Petersen, býráðslimi, dagfest 1. mai 2000, um at nýggjur kirkjugarður verður gjørdur í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 8. mai 2000:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til ummælis.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2000:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 5. juni 2000:** Umsitingin ger uppskot um økjan av verandi kirkjugarði at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot og kostnaðarmeting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2000:** Samtykt at senda málið til hoyring í kaldbaksnevndini.

**Kaldbaksnevndin 21. september 2000:** Uppskotið til nýggjan kirkjugarð, ið varð framlagt, helt nevndin verða í so umfatandi.

Samtykt at biðja um uppskot til minni víðkan av kirkjugarðinum vestureftir at leggja fyri nevndina aftur.

**Kaldbaksnevndin 22. november 2006:** Nevndin heitir á byggi- og býarskipanar-nevndina um at fyrireika arbeiðið at víðka kirkjugarðin í Kaldbak, tí at einki pláss er eftir.

Sí annars fundarfrásøgn frá borgarafundinum 23. oktober 2006, j. nr. 2005-2969.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at kommunan setur ein arkitekt at tekna eitt uppskot til nýggjan kirkjugarð, har atlit verða tikin til, at kirkjan er friðað og kirkjugarðurin skal fella so væl saman við kirkjuni sum gjørligt.

**Kaldbaksnevndin 13. mai 2008:** Málið hastar, bara nøkur fá pláss eru eftir í verandi kirkjugarði.

Eingin peningur er settur av til arbeiðið. Ynskiligt er, at kommunan tekur upp samskiftið við kirkjuráðið.

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2009:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið og vísti á møguliga staðseting.

- Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Arkitektlesandi og býarskipanardeildin hava saman við lendisdeildini gjørt uppskot til staðseting og skipan av kirkjugarðinum í Kaldbak. Uppskotið fevnir við verandi innrætting um 186 gravpláss.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býararkitekturin heitir á nevndina at taka undir við staðsetingini og senda málið til fíggjarnevndina, at útvega neyðugt lendi og fígging til at gera kirkjugarðinum fyri.

**Kaldbaksnevndin 27. januar 2010:** Staðbundnu limirnir ynskja kunning um, hvussu langt málið er komið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at umsitingin gerð eina kostnaðarmeting til komandi fund.

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Tóri í Hoyvík kunnaði um ætlanina við nýggjum kirkjugarði.

**Kaldbaksnevndin 23. februar 2011:** Tóri í Hoyvík kunnaði um ætlanina.

**Kaldbaksnevndin 18. mai 2011:** Kunnað varð um málið. Tilmæli er at keypa størri øki enn bert til kirkjugarðin. Borgarstjórin beinir málið í fíggjarnevndina.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2011:** Borgarstjórin greiddi frá málinum og heitir á løgdeildina at avgreiða málið sum skjótast.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Matrikuleringsviðurskiftini eru avgreidd av Umhvørvisstovuni. Væntandi verða øll formlig viðurskifti avgreidd innan fyri 2-4 vikur, so arbeiðið kann fara í gongd.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Kunnað varð um málið. Borgarstjórin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Staðseting er gjørd hvar kirkjugarðurin skal verða, byggisamtyktin broytt og lendið fingið til vega frá Búnaðargrunninum. Á fundi í Kaldbaksnevndini 29. mai 2012, varð umrøtt at samskipa arbeiðið við kirkjugarðinum við ætlaðu skipan av busssteðgiplássinum og umlegging av Krossgøtu við skúlan í Kaldbak. Mett var, at tað er skilagott um nøgdir av avgrevstartilfari og mold kann endurnýtast á staðnum.
Býarskipanar- og lendisdeildin gera tilfars- og nøgdarmetingar fyri kirkjugarðin og seta seg í samband við teknisku deild um at samskipa arbeiðini á besta hátt.
Peningur at gera projektuppskot er tøkur á projektkonto L65003.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður undir við staðsetingini, at gera projektuppskot og at taka upp samráð við teknisku deild um samskipan av uppgávunum. Prosjektuppskot við kostnaðarmeting at leggja fyri til fíggjarætlan 2013.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 14. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Keyp av lendi til nýggjan kirkjugarð**
Búnaðarstovan bjóðar kommununi at keypa 6.521 ferm. av matr. 22a og 49a í Kaldbak.
Keypsprísurin er íalt kr. 798.758,80. Kr. 766.000 eru tøkar á íløguætlanini til kirkjugarð í Kaldbak. Sostatt resta í kr. 33.000.

**Projektering av nýggjum kirkjugarði.**
Projekteringin av nýggjum kirkjugarði er mett at kosta kr. 200.000, og mettur kostnaður 4. mill. at gera nýggjan kirkjugarð.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at kommunan ognar sær lendi til nýggjan kirkjugarð, og at játta kr. 233.000 av framfluttum íløgukarminum 2011 á 6575 kirkjugarðar og at senda málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**188/12** **<u>2012-1503 TÍH</u>**

**<u>Bóltvøllur við ítróttarhøllina í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum-samandráttur:**
Heitt hevur verið í fleiri førum á kommununa um at skipa ein graslíkisvøll eystanfyri ítróttarhøllina í Kollafirði. Økið liggur óslættað. Eisini eru ynski um at byggja reiðskapsgoymslu eystur úr høllini uml. 6 m. Staðsetingin av vøllinum má ikki darva einari komandi útbygging.

Nú líkindi eru til at UEFA girðingin í Fola- og Purkugerði skal takast niður, verður skotið upp, at endurnýta timburgirðingina í Kollafirði. Neyðugt verður at slætta økið, stoypa kant 6800x50x50 cm at festa girðingina í, keypa graslíki + gummimáttu + 2 mál.
Mettur kostnaður, veitingar og arbeiðsløn 400.000 kr. u/mvg . Fígging er ikki tøk.

Fíggingaruppskot :
Fígging er ikki tøk til málið í 2012, neyðugt er tí við eini umraðfesting um ætlanin skal gjøgnumførast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býargartnarin mæla nevndini at staðseta vøllin eystanfyri høllina og at viðgera málið við møguligari umraðfesting av konto 6275 á fíggjarætlanini 2012 sambært lýsing og uppskoti omanfyri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 400.000 av konto 6275 við at umraðfesta arbeiðini soleiðis, at gongubrúgvin við Sandá verður útsett.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**189/12** **2011-1565 KF**

**Umsókn frá Annu Mohr um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1454a, Tórshavn, frá D1 til A3-øki.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ognin matr. nr. 1454a, Tórshavn, liggur við Sundsvegin og sambært almennu byggisamtyktini í D1 øki.

Umsøkjarin ynskir at byggisamtyktin verður broytt til A-byggiøki t.d. A3-øki.

Umsøkjarin sigur, at fleiri av ognunum í grannalagnum eru umflokkaðar og lagdar út sum byggiøkir.

Hetta er ikki heilt rætt. Eingin ogn í grannalagnum er broytt til byggiøki. Økið norðan eystanfyri ognina hevur síðani tað kom við í byggisamtyktina í 1982 ligið sum A1-byggiøki. Í sambandi við skipan av íbúðum á Blómubrekku bleiv byggisamtyktin broytt, soleiðis at økið Berjarbrekka, Blómubrekka og oman til og við 1458a, vóru broytt frá A1 til A3 øki. Henda broyting var góðkend av Oljumálaráðnum 8. apríl 2003. (J.nr. 2003-0363). 14. juli 2011var ein serstøk byggisamtykt um skipan av matr. nr. 1458a, Tórshavn, góðkend.

Hetta D1-øki hevur samband við D1-øki við Hoydalsá og gongur tvørtur um Sundsvegin yvir ímóti Útvarpshúsinum og Norðurlandahúsinum í einum uml. 150 m geira. Byggiøkið er báðu megin hendan geiran - A3-bústaðarøki norðanfyri og C2-øki sunnanfyri, har ætlanir eru um bygging. Økið í geiranum er privatar ognir við ástandandi húsum.

Vísandi til at, D1 øki gongur tvørtur um Sundsvegin, liggur ímillum byggiøkir og at bygging longu er inni á økinum, metir umsitingin ikki at nakað er til hindurs fyri at broyta byggisamtyktina fyri økið. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti vísandi til omanfyristandandi. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri D1 økið fram við Sundsvegnum niðan til Birnugøtu, verður at leggja fyri nevndina í august 2012.

Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen vilja tryggja, at atlit verður tikið til breiðkan av Sundsvegnum, fjarhitaleiðingum og øðrum.

Levi Mørk og Jan Christiansen átala harliga, at umsitingin ikki hevur gjørt uppskot til broytan av byggisamtyktini, soleiðis sum samtykt varð í byggi- og býarskipanarnevndini 11. apríl 2012.

**Býráðið 28. juni 2012:** Tikið av skrá.

**190/12** **<u>2012-0231 KF</u>**

**<u>Umsókn frá Christin Andreasen, adv, vegna Oddmar og Ann Mari Færø um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1457a, Tórshavn, frá D1 til A3-øki.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ognin matr. nr. 1457a, Tórshavn, liggur við Sundsvegin og sambært almennu byggisamtyktini í D1 øki.

Ognin er eisini skógarfriðað.

Umsøkjarin ynskir at byggisamtyktin verður broytt til A3-øki soleiðis at húsini kunnu útbyggjast.

Oddmar og Ann Mari Færø keyptu ognina matr. nr. 1457a, Tórshavn við ástandandi sethúsum óvitandi um at húsini ikki kundu útbyggjast av tí at tey liggja í D1-øki.
Rættarmál hevur verið koyrt ímóti seljarunum, sum nú er avgreitt við endaligari semju millum partarnar.

Víst verður á, at økið ikki er partur av nakrari heildarætlan viðvíkjandi fríøki og heldur ikki hevur samband við friðingina av Hoydalsá.

Umsøkjarin sigur, at økið norðan eystanfyri ognina er víðkað til at verða eitt A3-øki.

Hetta er ikki heilt rætt. Eingin ogn í grannalagnum er broytt til byggiøki.. Økið norðan eystanfyri ognina hevur síðani tað kom við í byggisamtyktina í 1982 ligið sum A1-byggiøki. Í sambandi við skipan av íbúðum á Blómubrekku bleiv byggisamtyktin broytt, soleiðis at økið Berjarbrekka, Blómubrekka og oman til og við 1458a, vóru broytt frá A1 til A3 øki. Henda broyting var góðkend av Oljumálaráðnum 8. apríl 2003. (J.nr. 2003-0363). 14. juli 2011var ein serstøk byggisamtykt um skipan av matr. nr. 1458a, Tórshavn, góðkend.

Hetta D1-øki hevur samband við D1-øki við Hoydalsá og gongur tvørtur um Sundsvegin yvir ímóti Útvarpshúsinum og Norðurlandahúsinum í einum uml. 150 m geira. Byggiøkið er báðu megin hendan geiran - A3-bústaðarøki norðanfyri og C2-øki sunnanfyri, har ætlanir eru um bygging. Økið í geiranum er privatar ognir við ástandandi húsum.

Vísandi til at, D1 øki gongur tvørtur um Sundsvegin, liggur ímillum byggiøkir og at bygging longu er inni á økinum, metir umsitingin ikki at nakað er til hindurs fyri at broyta byggisamtyktina fyri økið. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti vísandi til omanfyristandandi. Tó skal hædd takast fyri at partur av D1-økinum er skógfriðað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri D1 økið fram við Sundsvegnum niðan til Birnugøtu, verður at leggja fyri nevndina í august 2012.

Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen vilja tryggja, at atlit verður tikið til breiðkan av Sundsvegnum, fjarhitaleiðingum og øðrum.

Levi Mørk og Jan Christiansen átala harliga, at umsitingin ikki hevur gjørt uppskot til broytan av byggisamtyktini, soleiðis sum samtykt varð í byggi- og býarskipanarnevndini 11. apríl 2012.

**Býráðið 28. juni 2012:** Tikið av skrá.

**191/12** **2012-1222 TÍH**

**Umsókn um sparkivøll og grillpláss á matr. nr. 1180a**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyri árum síðan varð uppskot gjørt til skipan av frítíðarøkinum 1180a í Svanga. Økið liggur við Grønlandsvegin, Hvalsoyar- og Torsteinsgøtur og í Svanga. Hetta økið varð lagt av til óbygt øki í útstykkingarætlanini hjá Ólavi Højgaard sála. Allir íbúgvarnir í útstykkingini eiga sín part av felagsfrítíðarøkinum 1180a. Táverandi planur varð ongantíð settur í verk tí at semja var ikki millum íbúgvarnar/eigarnar.

Nú er ynski komið frá øllum eigarunum um at kommunan yvirtekur økið og skipar sparkivølll og grillpláss, annars fær kommunan ikki ognarrætt til økið.
Vanlig siðvenja hevur verið í nógv ár at kommunan ikki yvirtekur ognarrættindini til tílík frítíðarøki, men at kommunan / lendisdeidlin í samráð við eigarnar ella umboð teirra gera uppskot og við tí søkja kommununa um stuðul at fremja ætlanina. Víst verður til málið um spæliøki og bóltvøll í Dalakróki har kommunan tók undir við at veita stuðul kr. 300.000, sama er gjørt í Maritugøtu og øðrum útstykkingum.

Fíggingaruppskot :
Fígging er ikki tøk til málið í 2012, neyðugt er tí við eini umraðfesting um ætlanin skal gjøgnumførast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og.býargartnarin mæla nevndini til at viðgera málið við møguligari umraðfesting av konto 6275 á fíggjarætlanini 2012 sambært lýsing og uppskoti omanfyri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 300.000 av konto 6275 við at umraðfesta arbeiðini soleiðis, at smáttan við Sandá í Havnadali verður útsett.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**192/12** **2006-1053 BH**

**Alment wc í Kirkjubø**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 21. mai 2007:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at seta pening av til almenn wc í Kirkjubø og rakstur.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 15. oktober 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Higartil er ikki peningur settur av til verkætlanina. Søkt er um játtan í 2008 til slíkar íløgur.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til umbønina frá staðbundnu nevndini.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við áheitanini frá staðbundnu nevndini og at gera uppskot til staðseting og søkja avvarðandi myndugleikar um loyvi.

Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008:** Kunnað varð um málið. Arbeitt verður við at fáa neyðug loyvir til vega, men játtan er ikki sett av til hetta arbeiðið í íløgum. Møguliga kann hetta fíggjast um raksturin.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. mai 2008:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at arbeiða við eini loysn.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir biðja um status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 22. oktober 2008:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið. Málið er hjá Fornminnismyndugleikanum.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at verða kunnaðir um heildarætlanina frá fornminnismyndugleikanum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 9. desember 2008:** Svar er ikki komið frá Fornminnismyndugleikunum enn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi frá Føroya Fornminnissavni, dagf. 17.12.2008, fingið upplýst, at sambært áliti um heildarætlan fyri varðveitingini av fornminnum í Kirkubø, verður mælt ikki til at gera viðskiftahús, áðrenn politisk støða er tikin til tilmælið. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Leiðarin á lendisdeildini kunnaði um status í málinum. Nevndin samtykti at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina til endaliga staðseting av viðskiftahúsinum(almennum wc og buss-skýli).

**Ískoyti:**
3 uppskot eru í umboði, viðv. staðseting av viðskiftahúsi (alment wc og bussskýli). Umsitingin mælir til 3 møguleikar á trimum økjum, liggjandi í økinum H. Økið er lagt av til frílendi, úthús líknandi bygning til tænastur, men ikki íbúðarbygning.

Økini liggja á matrikkul nummar 8a (A). Vit mæla ti, at hetta økið er best egnað. Næstbest egnað er 10a (B). Triðja best egnaða økið er 20 C (C). Sí ávikavist niðanfyri, og hjáløgdu tekning:

| | |
|---|---|
| A.8a | Ognarviðurskifti: Búnaðargrunnurin fyrr (Føroya Jarðargrunnur) samb. Dóm 30.09.1999. Sí tekning: Uppskot til viðskiftahús í Kirkjubø, 09.01.1999, J.P. Gregoriussen & U. Patursson |
| B. 10a | Útbygging av kaffistovu. Gjøllari kanningar eru neyðugar |
| C. 20 c | Ognarviðurskifti Tórshavnar kommuna. |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at velja uppskot A.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

- Kunnað verður um status.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað varð um málið.

- Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Nevndin samtykti at heita á borgarstjóran um at taka málið upp við viðkomandi landsstýrisfólk, við støði í skrivi frá Føroya Fornminnissavni (j. nr: 2006-1053/13), vísandi til týdningin av at hava nøktandi umstøður í sambandi við ferðavinnuna og vitjandi annars. Nevndin ynskir at nýtt alment wc er uppsett áðrenn summar 2010.

Sjúrður Olsen farin av fundi.

Vísandi til skriv frá Sølvá Paturson, j nr 2006-1053/18, staðfestir nevndin, at wc verður tikið burtur áðrenn summar 2010.

- Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Málið útsett.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 18. januar 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um støðuna, eftir at borgarstjórin hevur havt fund við landsstýriskvinnuna mikudagin 3. mars 2010. Umsitingin skal eisini vísa á, at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini til viðskiftahús í Kirkjubø, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Málið útsett, tí at fundurin millum borgarstjóran og landsstýriskvinnuna varð útsettur.

**Ískoyti:**
Fundurin við landsstýriskvinnuna hin 3. mars 2010 var avlýstur av landsstýriskvinnuni.

Umsitingin hevur eisini havt samskifti við Føroya Fornminnissavn um málið. Í skrivi móttikið 30. mars 2010 svarar Fornminnissavnið, soleiðis:

> Við tað, at tær tænastur, viðskiftahúsið er ætlað til, eru alneyðugar, metir Fornminnissavnið tað verða skilabest at fremja uppskotið, ið fyriliggur. Hetta tó við tí fyrivarni, at talan er um eina fyribils loysn, av tí at nevndu tænastur fara at verða tiknar við í oman fyri nevndu yvirordnaðu økisskipanina. Vert er at gera vart við, at henda økisskipan fer at verða Tá hon fyriliggur, kann henda, at funnin verður onnur loysn á hesum tænastum, ið sampakkar við eina heild. Tá farið verður undir at fremja ætlanina til viðskiftahús eigur kommunan tí at hava hetta í huga.

Við hesi treytaðu tilsøgn ber nú sostatt til at seta eina fyribils loysn í verk. Leysliga mett vil ein detailprojektering kosta uml. kr. 150.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til ískoyti til fundin í teknisku nevnd 4. mars 2010, um manglandi fígging, sum nevndin má útvega áðrenn projektering og bygging verða sett í verk, og til treytaðu tilsøgnina frá Fornminnissavninum um eina fyribils loysn.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, álj. kr. 150.000,-, til at fremja omanfyri nevndu detailprojektering.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at biðja um tilboð uppá detailprojektering við støði í fyriliggjandi uppskoti. Tilboðið verður at leggja fyri fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommunar.

**Tekniska nevnd 23. september 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Málið útsett til nærri kanningar og at leggja fyri fíggjarnevndin aftur á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Tekniski stjóri kunnaði um málið. Málið verður tikið upp í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við leiðsluna á Tekniska skúla, um at fáa í lag eitt samstarv við skúlan um bygging av viðskiftahúsi í Kirkjubø. Skúlin er sera áhugaður í at luttaka í eini slíkari verkætlan, sum skúlin so eisini vil nýta í síni undirvísing fyrra hálvár 2011. Skúlin hevur luttikið í líknandi verkætlanum fyrr – eitt nú í Koltri og á Dímun. Skúlin ynskir tó ikki at standa fyri byggiarbeiðinum, men at okkurt byggivirki stendur fyri hesum, meðan næmingar skúlans luttaka sum arbeiðsmegi í sambandi við byggingina. Skúlin skal ikki hava løn til næmingarnar fyri sína luttøku, men hevur eitt ynski um, at kommunan kann veita ein stuðul til eitt nú lestrarferð hjá næmingum.

Umsitingin hevur viðgjørt ynskini hjá Tekniska skúla, og sær ikki nakran trupulleika í at arbeiðið verður gjørt eftir tí leisti, sum skúlin mælir til. Umsitingin mælir til, at tilboð verða umbiðin frá byggivirkjum uppá byggibúningararbeiði, og at sama virki eisini stendur fyri sjálvum byggiarbeiðinum, við hjálp frá næmingum á Tekniska skúla, sum eisini ger elementir o.a. bygningslutir.

Verætlanin verður fíggjað av avlopi frá lidnum verkætlanum, har avsettar eru kr. 1,0 mió. til verkætlanina, (sí j. nr. 2010-2717).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til:

1. at heita á fíggjarnevndina um at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum undirlendi til viðskiftahúsið
2. at heimila umsitingini at lata upp í hendi á ráðgeva at gera byggibúningarprosjekt v.m.
3. at heimila umsitingini at gera avtalu við Tekniska skúla um, at teir prosjektera bygningin sum ein timbur-element bygning og gera neyðugu bygningslutirnar í hesum sambandi
4. at kommunan rindar fyri tilfar, ið Tekniski skúlin nýtir til verkætlanina
5. at heimila umsitingini at bjóða byggibúningararbeiðið v.m. út sum undirhondsboð so skjótt avtala er gjørd um undirlendið.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 13. desember 2010:** Kunnað varð um málið.

Nevndin vísti á manglar so sum handikap-wc, skiftirúm til smábørn o.o. Biðið verður um at síggja endaliga tekning, áðrenn byggingin byrjar.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi upspkoti.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskotið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. februar 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi uppskoti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna uppskotið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og góðkenna fyriliggjandi uppskot og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til 2. desember 2010 tó við teirri broyting at pkt. 5 verður orðað soljóðandi:

> at heimila umsitingini at gera avtalu við arbeiðstakara um at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiðinum saman við tekniska skúla og at kommunan sjálv stendur fyri grevstrar- og planeringsarbeiði við hartilhoyrandi grevstri fyri veitingum (kloakk, vatn og el).

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og gera avtalu við arbeiðstakara um at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiðinum saman við tekniska skúla og at kommunan sjálv stendur fyri grevstrar- og planeringsarbeiði við hartilhoyrandi grevstri fyri veitingum (kloakk, vatn og el).

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av býráðssamtykt frá 14. apríl 2011 hevur umsitingin gjørt avtalu við ymsar arbeiðstakarar at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiði saman við tekniska skúlanum umframt at kommunan sjálv hevur staðið fyri planeringini. Higartil eru nýttar ca 0,4 mió. kr. og fyri hetta er grundøkið planerað liðugt og arbeiðið ísv. forskalling er í gerð.

Sambært framskrivaðari fíggjarmeting hjá umsitingini, j, nr. 20060-1053/111, verður samlaði fíggjartørvurin fyri wc-bygningin og bus terminalin í Kirkjubø álj. kr. 1.300.789,-. Játtaðar eru 1 mió. kr. og sostatt skulu játtast uml. 0,3 mió. afturat, um bygningurin kann gerast sum upprunaliga ætlað.

Kunnað verður annars um gongdina í málinum.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at játta írestandi upphædd álj. kr. 300.000,- av kto. 7510, bussleiðin og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**193/12** **2012-0027 RFP**

**Kloakkútlop í bátahavnina á Argjum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við løggilding av kloakkini í Tórshavnar kommunu verður neyðugt at flyta kloakkina, sum nú rennur í bátahavnina, út um grótkastið, so hylurin verður reinur fyri kloakkvatn.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 300.000 av játtanini fyri íløgur 2012 til projektering og uppmáting, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión Víst verður annars til skjal 2012-0027/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 300.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin hildin 12. juni 2012, kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, . j.nr. 2012-0027/5.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 2012-0027/6, verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektinum kr. 1.966.631,-. Býráðið hevur 26. januar 2012 játtað kr. 300.000,- til projektering og útbjóðing. Sostatt er fíggjartørvurin kr. 1.666.631,-.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta 1.7 mió. kr. av íløgum fyri kloakkir í 2012, §6, 6875 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**194/12** **2012-0026 RFP**

**Kloakkútlop við Rættargøtu á Argjum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Av tí at kloakkin, sum rennur frá reinsiverkinum við Rættargøtu á Argjum, og leiðingin frá Norðasta Horni, liggur rættiliga tætt við Sandagerð, sum er eitt stað ið nógv verður nýtt sum frítíðarstað og sum grindavág, verður neyðugt at leingja kloakklopið út á fjørðin uml. 50 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 200.000 av játtanini fyri íløgur í 2012 til projektering og útbjóðing, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión. Víst verður annars til skjal 2012-0026/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin hildin 12. juni 2012 kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2012-0026/5.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr, 2012-0026/6. verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektinum kr. 591.728,-. Býráðið hevur 26. januar 2012 játtað kr. 200.000,- til projektering og útbjóðing. Sostatat er fíggjartørvurin kr. 391.728,-.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta 0,4 mió. kr. av íløgum fyri kloakkir í 2012, §6, 6875 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**195/12** **1999-1521 EY**

**Vegamótið við landsvegin á Hvítanesi (Gøta til Hvítanesar)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur havt fundir við Landsverkfrøðingin um viðurskiftini viðvíkjandi gerð av viadukt og busslumma á vegamótinum frá landsvegnum oman í bygdina.

Landsverkfrøðingurin hevur fingið játtan fyri fígging fyri árið 2001 av arbeiðinum at gera eina viadukt undir landsvegin.

Skal viaduktin gerast, verður neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at gera eina gongubreyt í ovara borði frá íbindingini og niðan móti Vegnum Langa. Landsverkfrøðingurin hevur gjørt uppskot og kostnaðarmeting av arbeiðinum at gera eina viadukt. Umsitingin hevur gjørt uppskot til busslumma.

Um Landsverkfrøðingurin fer undir at gera viadukt, so skal Tórshavnar kommuna gera og rinda fyri gongubreyt í ovara borði, sum verður mett at kosta einar 1,5 mill. kr. Landsverkfrøðingurin hevur boðað frá, at um gongubreyt verður gjørd á niðaru síðu, so eru teir sinnaðir at gjalda fyri gongubreytina og gonguteigin tvørtur um Hvítanesvegin við Vegin Langa. Tó veitir og uppsetir kommunan gøtuljóssteyrar.

Tekniska nevndin helt ástaðarfund mánadagin 3.desember 2001, kl. 13.00. Har var avgjørt, at um hvítanesnevndin varð kunnað, so skuldi arbeiðið setast í gongd at gera gongubreyt í niðara borði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at staðfesta avgerðina frá ástaðarfundinum hjá teknisku nevndini tann 3. desember 2001, soleiðis at gjørd verður gongubreyt á niðaru síðu á landsvegnum, sum Landsverkfrøðingurin rindar fyri, og at kommunan stendur fyri og rindar gøtuljósarbeiðið.

**Tekniska nevnd 14. desember 2001:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Umsitigin leggur fram uppskot frá P/F HMP Conslult til støðutakan. Økið til gøtuna verður býtt soleiðis á fylgjandi ognum:

a) Uml. 819 m² av matr. nr. ’f’, Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
b) Uml. 384 m² av matr. nr. 135et, Hoyvík (partur av matr. nr. 2, eigari Føroya Jarðarráð).
c) Uml. 452 m² av matr.nr. ’f’, Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fyribils kostnaðarmeting frá P/F HMP Consult fer gøtan at kosta uml. 1,2 mió. kr. u/mvg, men við ráðgeving og eftirliti.

Vísandi til býtið av íløgum fyri fíggjarárið 2004 (sí notat j. nr 200400093/3), eru settar 1,0 mió kr. til gøtuna til Hvítanesar og kr. 2.677.300,- til Ytra Ringveg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til,
at taka undir við fyriliggjandi uppskoti frá P/F HMP Conslult.

at mæla býráðnum til, um figgjarnevndina, at ognartaka:

a) uml. 819 m² av matr. nr. 'f', Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
b) uml. 384 m² av matr. nr. 135et, Hoyvík (partur av matr. nr. 2, eigari Føroya Jarðarráð).
c) uml. 452 m² av matr. nr. 'f', Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).

at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, tá ið eigaraviðurskiftini eru fingin í rættlag.

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka upp samráðingar við eigararnar, um at kommunan ognar sær lendið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at umsitingin hevur vent sær til ein av eigarunum - Landsverk, hevur stovnurin boðað frá, at ætlaða gøtan liggur ov nær skráanum til landsvegin.

Umsitingin hevur í hesum sambandi gjørt nýtt uppskot við kostnaðarmeting til gøtusamband millum Hvítanes og Klingruna, sí j. nr. 200500503/3 og 4. Annað uppskotið er har gongugøtan verður knýtt í nýggju rundkoyringina við Vegin Langa og hitt er við eini viadukt stutt norðan fyri nýggju rundkoyringina við vegamótið Vegurin Langi/Hvítanesvegurin.

Støða skal verða tikin til um:

1. kommuan skal halda fast við áður tikna avgerð í teknisku nevnd tann 4. mai 2004, ella um
2. kommunan skal taka undir við nýggja uppskotinum,ella um
3. kommunan skal sleppa ætlanini at gera gøtu til Hvítanesar.

Kostnaðarmetingar verða framlagdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at beina málið í hvítanesnevndina til kunningar.

**Tekniska nevnd 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at beina málið í hvítanesnevndina til ummælis.

**Hvítanesnevndin 9. juni 2005:** Nevndin heitir á myndugleikarnar um at skipa fyri, at Hvítanes fær somu gongubreytarloysn sum Norðasta Horn ella Oyggjarvegurin frá Krákugjógv til gamla Dalavegin.

Nevndin vísir staðiliga á, at ein loysn hevur bráðskund, tí í dag ferðast nógv fólk til gongu á landsvegnum, eisini foreldur við barnavognum.

**Hvítanesnevndin 22. september 2005:** Nevndin minnir á málið og biður um, at málið verður loyst.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sett seg í samband við Landsverk við fyrispurningi um møguleika fyri at fyriskipa gongugøtuna á sama hátt, sum gjørt er fram við Velbastaðvegnum sambært áheitan frá staðbundnu nevndini frá 9. juni 2005.

Landsverk eru ikki sinnaðir at loyva hesi loysn vísandi til, at pláss ikki er fyri einum grønum geira millum koyribreyt og gongugøtu. Eisini er stovnurin ikki sinnaður at lata gera gongugøtu fram við koyribreytini, vísandi til at talan er um ein 80km/t veg. Landsverk er haraftur ímóti sinnaður at lata gøtuna liggja í skráanum.

Umsitingin hevur saman við ráðgeva latið gera nýggj uppskot sum taka støði í seinastu viðmerkingunum frá Landsverki. Uppskotini verða framløgd av ráðgeva og umsitingini.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin vísir til tilmælið til fundin í nevndini 4.mai 2004.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og at beina málið í hvítanesnevndina. (sí mál nr. 1999-1521/9).

**Hvítanesnevndin 1. desember 2005:** Nevndin vísir til skriv frá Landsverki, dagfest 25. oktober 2005, og mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum til gerð av gøtu fram við landsvegnum við ásettum treytum, og at farið verður gongd við arbeiðið sum skjótast.

Eisini verður mælt til, at vegstokkur verður fram við allari gøtuni.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at heita á Landsverk um at gera arbeiðið.

Kr. 1.000.000 eru avsettar til arbeiðið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur innheintað kostnaðarmetan frá HMP Consult viðvíkjandi gerð av 2 m breiðari breyt aftan fyri vegstokk og sambært kravi frá LV 1,5 m frá vegastokkinum. Ein fyribils kostnaðarmetan vísir kr. 5.535.259,00.

Kostnaðarmetanin er nærri útgreinað í skjali 1999-1521/31. Viðmerkjast skal, at ognartøka er ikki íroknað.

Mett verður at talan er um eina sera dýra loysn við tað, at neyðugt er at breiðka allan høvuðsvegin, sum í støðum hevur upp til 25 m langan skráa oman eystureftir.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006**: Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina, at fara undir samráðingar við Landsverk at yvirtaka Hvítanesvegin frá Eystara Ringvegi til rørportrið á høvdini norðan fyri Hvítanes.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

Fíggjarnevndin 15. mars 2006: Samtykt at taka upp samráðingar við Landsverk.

Hvítanesnevndin 8. juni 2006: Nevndin tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd um at yvirtaka Hvítanesvegin, soleiðis at endalig loysn fæst á málinum um gongubreyt til Hvítanesar.

Nevndin biður um at fáa eina tíðarætlan fyri møguligari yvirtøku.

**Hvítanesnevndin 6. september 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Nevndin vísir aftur á gøtu í ovara borði við viadukt – vegna ferðslutrygd ella 50 km veg.

**Hvítanesnevndin 31. januar 2008:** Útsett til næsta fund.

**Hvítanesnevndin 4. september 2008:** Málið varð umrøtt. Málið verður parkerað inntil greiða er fingin á nýggja innkomuvegnum til Havnar.

Málið verður sent fíggjarnevndini til kunningar.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 17. desember 2008:** Samtykt at taka málið upp við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, um at yvirtaka vegin.

- Umsitingin greiðir frá status í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til:
1. at taka upp samráðingar við Landsverk um at bøta um ferðslutrygdina við vegamótið á Hvítanesvegnum við Mannbrekku.
2. at taka upp samráðingar við landstýrismannin um yvirtøku av Hvítanesvegnum frá Eystara Ringvegi norður um íbindingina frá Sandvíkarhjalla.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**Hvítanesnevndin 24. september 2009:** Býarverkfrøðingur kunnaði um málið.

- Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið. Umboð frá Landsverki koma at greiða frá støðuni í málinum.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** (Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli).

Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot um gøtu, vísandi til t-bræv frá Landsverk, dagfest 13. januar 2010, j nr 1999-1521/48.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur biðið HMP Consult um uppskot og kostnaðarmetan viðvíkjandi gerð av 2 m breiðari breyt aftan fyri vegstokk í samsvar við teldubræv frá Landsverk, dagfest 13. januar 2010, j nr 1999-1521/48, og við træbrúm fram eftir vegskráanum, har hesin eru brattastur.

Uppskotið frá HMP Consult er lýst við plantekning, skurðum og kostnaðarmeting á kr. 2.583.870,- tá MVG, óvæntað og lendisútvegan ikki er íroknað, sí j. nr. 1999-1521/49.

Umsitingin metir kostnaðin av hesi gøtuni at verða kr. 3.405.166,-, tá MVG, óvæntað, umsiting og lendisútvegan er íroknað, sí j. nr. 1999-1521/50.

Umsitingin skal vísa á, at eftirverandi játtan í mesta lagi røkkur til projektering, og at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini fyri 2010 til gøtu til Hvítanes, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at uppskotið verður latið Landsverk til ummælis, og at tað verður ikki arbeitt meira við verkætlanini fyrr enn nøktandi játtan er útvegað.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Samtykt at lata uppskotið til Landsverk til góðkenningar og síðani aftur í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sent skriv til Landsverk, har biðið verður um at Landsverk góðkennir at gøtan verður gjørd samsvarandi uppskotinum frá HMP Consult, har gøtan verður gjørd við træbrúm fram eftir vegskráanum, har hesin eru brattastur (sí j. nr. 1999-1521/52).

Landsverk hevur í skrivi, dagf. 20. mai 2010, til Tórshavnar kommunu, í høvuðsheitum góðkent at gøtan verður gjørd samsvarandi uppskotinum frá HMP

Consult og vil lata brúksrætt til lendið undir gøtuni, men setir ymsar treytir m.a. um at íbinding av gøtuni við endarnar verður lýst betur, um at gøtan verður íbundin niðan fyri bussskýlið við Hvítanes, um at atkoma verður frá gøtuni til gonguteigarnar við rundkoyringina og um girðing fram við landsvegnum og girðing av gøtuni (sí j. nr. 1999-1521/53).

Umsitingin hevur biðið HMP-Consult kostnaðarmeta gøtuna av nýggum, við fyriliti fyri teimum treytum, sum Landsverk setir.

Umsitingin metir nú kostnaðin av hesi gøtuni at verða kr. 3.870.000,-, tá MVG, óvæntað, umsiting er íroknað og tá treytirnar frá Landsverk verða loknar (sí j. nr. 1999-1521/55).

Umsitingin skal aftur vísa á, at eftirverandi játtan í mesta lagi røkkur til projektering, og at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini fyri 2010 til gøtu til Hvítanes, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini vísa til samtykt í Hvítanesnevndini 4. september 2008 og mæla til, at málið verður parkerað, til greiða er fingin á nýggja innkomuvegnum til Havnar, ella í øðrum lagi, at málið verður beint í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Tekniska nevnd 23. september 2010:** Málið varð umrøtt.

**Hvítanesnevndin 14. mars 2011:** Býarverkfrøðingurin tekur málið upp við Landsverk. Málið verður lagt fyri ferðslunevndina.

**Ferðslunevndin 12. desember 2011:** Útsett.

**Ferðslunevndin 15. desember 2011:** Til næsta fund er ynskiligt at umboð frá Landsverk verður innkallað.

**Ferðslunevndin 17. januar 2012:** Fríðrík Heinesen var og greiddi frá treytum, sum Landsverk setir í sambandi við gøtuna fram við vegnum til Hvítanesar. Víst varð til skriv, dagfest 20. mai 2011, frá Landsverk.

**Ískoyti:**
Grundað á seinastu afturmeldingarnar frá Landsverki, har víst verður til skriv dagf. 20. mai 2012, (j.nr.1999-1521/53) eru staðfestingarnar frá kostnaðarmetingini frá umsitingini (j. nr. 1999-1521/54 og 1999-1521/55) framvegis galdandi. Sostatt er samlaði fíggjartørvurin fyri nevndu gøtu kr. 3.867.422,-.

Fyri at fáa eftirkanna um tað kunnu finnast aðrar loysnir enn tær, ið Landsverk hevur víst á, var ástaðarfundur hildin 31.01.2012 við m.ø. umboðum frá Landsverki. Endamálið við fundinum var at fáa staðfest um tað ber til at flyta verandi autoverju nærri vegmiðju á landsvegnum, uttan at hetta kemur at nerva tekniskum ásetingum hjá Landsverki.
Sambært upplýsingum frá Landsverki ber hetta til, men flytingin av autoverjuni á einstøkum strekkjum kann bert verða gjørd við at seta upp betonverju og samstundis taka verandi autoverju niður. Sp/f HMP Consult eru bindir um at koma við eini kostnaðarmeting av hesi teknisku loysnini.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti (j. nr. 1999-1521/63) og mælir til at umsitingin fær Landsverk at vátta at stovnurin tekur undir við uppskotinum, at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000 av íløgum, § 6, konto 8175 - Gøta til Hvítanesar og beina málið um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, havt samskift við Landsverk um loysn, haðani svar er komið, at tikið verður undir við fyriliggjandi uppskoti frá sp/f HMP Consult. Umsitingin greiðir frá uppskotinum.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at játta 1,4 mió. kr. av íløgum, § 6, konto 8175 - Gøta til Hvítanesar, at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Hvítanesnevndin 21. mai 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar, hevur vegna kommununa, sett arbeiðið at gera gøtuna í útboð, har eisini var biðið um alternativt tilboð, við tí fyritreyt at avlopsgrót verður heintað av Vinnuøkinum á Skarðshjalla.

Tríggir arbeiðstakarar lótu boð inn og lægsta boð hevði Sp/f Plan (sí j. nr. 1999-1521/83).
Lægsta alternativa boð hevði eisini Sp/f Plan (sí j. nr. 1999-1521/83).

Fyrisitingin hevur, fyri ávikavist lægsta boð og lægsta alternativa boð, mett um samlaða kostnaðin fyri arbeiðið, har prosjektering, eftirlit, óvæntað og MVG eru íroknað, (sí ávikavist j.nr. 1999-1521/84) og 1999-1521/85).

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Higartil eru játtaðar tilsamans kr. 1.5 mió. til arbeiðið til at gera gøtuna til Hvítanesar.
Játtaðar eru kr. 100.000,- kr. sambært býráðssamtykt 23. februar 2012 og 1,4 mió. sambært býráðssamtykt 2. mai 2012.
Sambært samlaðu kostnaðarmetingini (sí j. nr. 1999-1521/85), er fíggjartørvurin fyri arbeiðið kr 3.013.000,-. Sostatt er tøvur fyri at fáa játtað kr. 1.513.000,- afturat av íløgum, § 6, konto 8175 – til at gera gøtuna til Hvítanesar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at:

1. taka av lægsta boði frá sp/f Plan álj. sambært skjali nr. j. nr. 1999-1521/83. álj. kr.2,3 mió kr.
2. beina málið í fíggjarnevndina og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndini, til at fíggja upphædd álj. kr. 1,5 mió. av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til rundkoyring Sundsvegur–Blómubrekka-Óluvugøta (mál nr. 2008-3134).

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**196/12** **2011-1538 EY**

**Eyðbjørn Gaard: Áheitan vegna Eigarafelagið undir Borgarhálsi um fund og greiða frá allari verkætlanini um vegagerðina undir Borgarhálsi á Velbastað.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur á fundum við umboð fyri eigarafelagið undir Borgarhálsi viðgjørt áheitan teirra um at dagføra vegin undir Borgarhálsi.

Víst varð á, at kommunan ikki hevur sett pening av til liðuggerð av øllum útstykkingarvegnum, soleiðis at liðuggerðin kann gerast í einum. Stórur partur av vegnum manglar slitlag og kansteinar, og áðrenn hetta arbeiðið kann gerast, skulu neyðugar regnvatnsleiðingar regulerast. Sama er galdandi fyri vegaprofil, tí atlit skulu takast fyri verandi tún og íbindingar.

Tað fyriliggur eingin kostnaðarmeting fyri liðuggerðina, men leysliga mett kemur arbeiðið at kosta umleið 3 til 4 mió. kr. og at málið skal staðfestast um teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstardeildini mæla nevndini til at taka støðu til, um farast skal undir at gera eitt skitsu uppskot við kostnaðarmeting, fíggjað av íløgum fyri 2012 §6 8175 'Vegakervið Dvørgastígur/undir Borgarhálsi', at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Nevndin samtykti at gera eitt skitsu uppskot við kostnaðarmeting av at gera vegin undir Borgarhálsi lidnan, fíggjað av íløgum fyri 2012 §6 8175 'Vegakervið Dvørgastígur/undir Borgarhálsi'.

**Ískoyti:**
Biðið verður um kr. 300.000,- at gera skitsu uppskot við kostnaðarmeting, fíggjað av íløgum fyri 2012 §6 8175 'Vegakervið Dvørgastígur/undir Borgarhálsi', har avsettar eru kr. 2.mill fyri 2012.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at útgreina og lýsa nærri.

**Ískoyti:**
Vísandi til at nevndarlimir í fíggjarnevndini hava beint málið aftur í teknisku nevnd, skal verður víst á, at ætlaða upphæddin skal nýtast til at gera eitt skitsu uppskot við kostnaðarmeting. Sjálvur vegurin er uml. 500 m, og fyri at fáa vegin gjørdan lidnan, skal peningur setast av til slitlag og kantsteinar. Neyðugar regnvatnsleiðingar skulu eisini regulerast. Sama er galdandi fyri vegaprofil, tí atlit skulu takast fyri verandi tún og íbindingar. Talan er um veg, sum er gjørdur av Kirkjubø/Velbaðstaðar kommunu undan samanleggingini við Tórshavn, men sum ongantíð er gjørdur liðugur.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Vísandi til omanfyristandandin lýsing og til samtykt frá 8. november 2011, verður mælt til at játta kr. 300.000 til skitsuprosjektering við kostnaðarmeting. Málið verður beint aftur í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir biðja um status við vegagerðini undir Borgarhálsi.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 12. mars 2012:** Býarverkfrøðingurin greiddi frá málinum. Málið verður lagt fyri teknisku nevnd 19. apríl ella 22. mai 2012.

**Ískoyti:**
Skitsuuppskot við kostnaðarmeting verður framlagt á fundinum. Sambært fyribils metingum kemur dagføringin av vegnum at kosta kr. 2.250.000,-.
Tekniska nevndin skal taka støðu til, hvussu dagføringin av vegnum skal fíggjast.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at játta 1,7 mió. kr., fíggjað av íløgum fyri 2012, §6 8175 Dvørgastígur/undir Borgarhálsi' og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Eisini samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Borgarstjórin tók málið av skrá, tí fígging fyriliggur ikki í nóg stóran mun til verkætlanina, og er sostatt ikki klárt at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,7 mió. kr., fíggjað av íløgum fyri 2012, §6 8175 Dvørgastígur/undir Borgarhálsi. Eisini samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

Eisini samtykt at arbeiða víðari við at útvega fígging til vegagerðina á Dvørgastígi.

**Býráðið fyri læstum hurðum 2. mai 2012**: Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar, hevur vegna kommununa, sett arbeiðið at dagføra vegin Undir Borgarhálsi í útboð.

Sjey arbeiðstakarar lótu boð inn og lægsta boð hevði Sp/f Maskinkoyring (sí j. nr. 2010-2519/15).

Fyrisitingin hevur fyri lægsta boð, mett um samlaða kostnaðin fyri arbeiðið, har prosjektering, eftirlit, óvæntað og MVG eru íroknað, (sí j. nr. 2010-2519/16).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin samtykkir, at taka av tilboðnum frá sp/f Maskinkoyring, við støði í teirra tilboði (sí j. nr. 2010-2519/10) og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at útvega kr. 700.000,- afturat av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til dagføring av Sundsvegnum (mál nr. 2008-1294).

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**197/12** **2012–1353 (sí eisini má nr. 2007-2796) (EY)**

**Býingavegur millum Blómubrekku og Villingardalsvegin – 1. stig**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í framhaldi av máli nr. 2007-2796, fevnir hetta málið um sjálva vegagerðina av vegi millum útstykkingina hjá sp/f Bjarni Poulsen og Blómubrekku.

Talan er um vegagerð sambært skjali nr. 2007-2796/35, sum verður framlagt til støðutakan.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyri at fara undir vegagerðina er neyðugt at játta fígging, sum sambært fyribilsmetingum er mett til at verða uml. 2,1 mió. kr. smb. skjali j. nr. 2012-1353/4. Fíggjartørvur álj. 2,1 mió verða at útvega sum eykajáttan sambært skjali j. nr. 2012-1353/5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at:

1. taka undir við skitsu uppskotinum skjali nr. 2007-2796/35.

2. beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at fíggja upphædd álj. kr. 2,1 mió. av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til Glyvursveg við brúgv (mál nr. 2006-3283).
3. heimila umsitingini at fara undir at bjóða arbeiðið út sum inboðin lisitatión at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**198/12** **2012-1405 SC**

**Dagføring av reglugerð fyri leysar sølubúðir og hissini søluloyvir**

Øktu umsóknirnar og viðgerðirnar av umsóknum um loyvi til leysar sølubúðir og hissini søluloyvir hevur økt um tørvin á dagføring av verandi relgugerðum. M.a. í sambandi við viðgerðina av málinum um umsókn frá sp/f Eldborg Fisk, um loyvi at selja fisk og fiskarættir í Gongugøtuni – j.nr. 2003-2327 – hevur spurningur eisini verið reistur um verandi reglugerð fyri leysar sølubúðir, j. nr. 2002-2283.

Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur dagført verandi reglugerð fyri leysar sølubúðir, so at henda eisini umfatar Sølutorgið í Vágsbotni umframt ásetingar fyri hissini søluloyvi, sjá j. nr. 2012-1405/1. Reglugerðin ásetir, m.a. at *Søla av fiski skal sum meginregla fara fram á Sølutorginum í Vágsbotni*. Reglugerðin ásetir eisini eitt avgreiðslugjald á kr. 300,-/ár fyri loyvi til leysa sølubúð. Hissini søluloyvi eru ókeypis.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at nevndin tekur undir við reglugerðini, at mál nr. 2002-2283 og 2003-2327 verða lokaði, og at nevndin beinir málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd, tó við teirri broyting at grein 11 og 16 í reglugerðini verða strikaðar.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**199/12** **2009-1489**

**Nevndarsamtyktir - Boðanesheimið : Eldradepilin yviri við strond**

**Upprit**
Dagfest: 12 juni 2012

At bjóða uppá leyst innbúgv til Boðanesheimið, vóru 7 veitarar bjóðaðir at koma við tilboði.

Tilboðini uppá leyst innbúgv vóru latin upp tann 4. juni 2012, í fundarhølinum á Ráðhúsinum.

5 tilboð komu inn. Idé Møblar og Vøruhúsið á Hjalla lótu ikki tilboð inn. Tilboðini sum komu inn, ljóðaðu uppá:

| | |
|---|---|
| Blika | kr. 1.492.655 |
| Byggitilfar | kr. 1.538.557 |
| Eikin | kr. 1.096.937 |
| Eikin (alternativ) | kr. 1.398.687 |
| Inventartænastan | kr. 1.807.093 |
| Inventartænastan (alternativ) | kr. 1.657,573 |
| Nema | kr. 1.648,520 |

Útbjóðingin var, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, skipað soleiðis, at tað var latið upp í hendurnar á veitarnum, sjálvar at velja tær vørur, sambært frágreiðingum í útbjóðingartilfarinum. Í útbjóðingarskrivinum dagfest 21. mai 2012 stendur:
*"Biðið verður um eina tilboðsupphædd fyri leyst innbúgv og eina fyri skrivstovuinnbúgv. Harumframt kann tilboð gevast uppá alt samlað. Byggiharrin tilskilar sær rætt at luta arbeiðstøkuna sundur í tvey. (Leyst innbúgv og skrivstovuinnbúgv).*
*Mett verður um tilboðini bæði út frá prísi, góðsku og útsjónd".*

Leggjast skal afturat, at biðið er um **tilboð** uppá veitingarnar.

Tilboðini vóru latin upp tann 05.06.2012 í fundarhølinum hjá Tórshavnar kommunu á Vaglinum. Hjástødd vóru:
Unnie Justinussen, Jákup Egholm Hansen og Joan Petur Hentze umboðandi Tórshavnar kommunu, og Sverri Heinesen umboðandi sp/f Rúm.

Ein bólkur, mannaður við umboðum fyri ráðgevara, Tórshavnar kommunu og Boðanesheimið, hevur kannað tilboðini, hugt var at prísinum, dygdini og sniðinum. Eftir einari yvirskipaðari gjøgnumgongd, var avrátt at hyggja nærri eftir tilboðunum frá Blika, Inventartænastuni, Nema og Byggitilfar.

**Alment um meting av tilboðum**
Leisturin, at lata veitarin velja vørurnar, ger, at tað ikki kann gerast ein beinleiðis samanbering. Bólkurin hevur tó samanborið útvaldar vørur, sum kunnu metast at hava stóran týdning fyri brúkið á Boðanesheiminum. Samanberingin er við atliti at dygd, kostnaði og sniði.

Ráðgevarnir hava kannað tilboðini til botns. Áðrenn tilboðini vóru latin inn, høvdu veitarnir møguleika at seta spurningar, og gera viðmerkingar í útbjóðingartíðarskeiðinum.

**Niðurstøða** av gjøgnumgongd við atliti at dygd og snið.

Bólkurin er samdur um, at Byggitilfar hevur tí bestu samlaðu veitingina, tá hugt verður sniði góðsku og prísi. Tilfarið frá Byggitilfar er greitt. Sniðið er tíðarleyst og góðskan er góð í mun til kostnaðin.

Tilmælið byggir á tilfarið, tilboðsveitara hava sent inn merkt:
**“Tilboð Boðanesheimið innbúgv”**

Tilboðini eru gjøgnumgingin í bygginevndini, og í samráð við bólkin sum hevur kannað tilboðini, mælir bygginevndin til at fara í sáttmálasamráðing við Sp/f Byggitilfar um veiting av leysum innbúgvi og skrivstovuinnbúgvi til Boðanesheimið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á sosialu deild taka undir við bygginevndini og mæla til at farið verður í sáttmálasamráðing við Sp/f Byggitilfar um veiting av leysum innbúgvi og skrivstovuinnbúgvi til Boðanesheimið.

**Sosiala nevnd 26.juni 2012**: Ein meiriluti: Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal og Vagnur Johannesen taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen tekur undir við tilboðnum frá Eikini kr. 1.096.937,00.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd við teirri broyting, at nevndin mælir býráðnum til at taka gera sáttmála við Sp/f Byggitilfar um veiting av leysum innbúgvi og skrivstovuinnbúgvi til Boðanesheimið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Sjúrður Olsen, mælir býráðnum til at taka undir við tilboðnum frá Eikini kr. 1.096.937,00.

**Býráðið 28. juni 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Bogi Andreasen, Vagnur Johannesen og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

# Mál uttan fyri skrá.

**200/12** **2009-3106**

**Tórshavnar Musikkskúli – útvegan av hølum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 1. juni 2011 samtykti bygginevndin formliga at senda byggi- og býarskipanarnevndini um mentamálanevndina umbøn um at viðgera og góðkenna staðseting av nýggjum Musikkskúla á matrikklarnar 1453a, 1410d (lutur I) og 1409 (lutur I), eigari Tórshavnar kommuna, samsvarandi skitsuuppskoti.

Umbønin hjá bygginevndini skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðið við skitsuuppskoti og byggiskrá er um at verða liðugt. Bygginevndin hevur alla tíðina arbeitt við staðseting eystanfyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Bygginevndin hevur mett at henda staðseting er væl egnað til Musikkskúla, tí

hetta liggur væl fyri í mun til stóru ferðsluæðrirnar, og at Musikkskúlin og Norðurlandahúsið sum nærmastu grannar fara at fáa gagn av hvørjum øðrum serliga í mun til konsertvirksemi og høli.

Sambært galdandi mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna staðseting, eftir at avvarðandi faknevnd hevur góðkent byggiskránna.

Staðsetingin og byggiskráin eru ikki viðgjørd av umsitingini á Byggi- og býarskipanardeildini undan hesum fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Málið varð útsett.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið byggiskránna og mælir til at góðkenna hana við fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at taka upp samráðingar um høvuðsráðgeva og um prosjektering, at undirráðgevingin verður boðin út, og at játtaðar verða kr. 3.800.000 av íløgujáttanini fyri 2011 á kontu 5175 til prosjektering.

Sambært galdandi mannagongd fyri íløguverkætlanir skal tekniska nevnd viðgera og góðkenna tekniska partin. Mentamálanevndin hevur 15. juni 2011 sambært somu mannagongd beint málið um at góðkenna staðseting til byggi- og býarskipanarnevndina. Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini, og at taka upp samráðingar við Kontrast um høvuðsráðgeva og um prosjektering. Undirráðgevingin verður boðin út.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at beina tekniska partin fyri teknisku nevnd at viðgera og góðkenna, og at beina tilmælið um at játta kr. 3.800.000 til prosjektering av kontu 5175 í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Nevndin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó tekur Annfinn Brekkstein støðu til spurningin um samráðingar um høvuðsráðgeva á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Staðsetingin av nýggjum musikkskúla eystanfyri Norðurlandahúsið, er í byggiskránni grundgivin soleiðis:

*"Staðsetingin er vald útfrá verandi funktiónum í økinum við Kringvarpið og Norðurlandahúsið. Eitt mentunarøki sum við einum musikkskúla afturat sær fer at skapa synergi og eitt spinn off sum verður føroyskum tónleiki at frama. Hølisviðurskiftini í hesum trimum húsum koma at komplementera hvørt annað – bæði í sambandi við tónleikatiltøk og gerandisdag. Ùtvarpshúsið og Norðurlandahúsið hava eisini eina hitaskipan sum musikkskúlin ómakaleyst kann knýta seg uppí."*

Grundøkið fevnir um 3 matriklar og er umleið 9499 m² til støddar:

Matr. nr. 1453a,
Eigari er Tórshavnar Kommuna
Støddin er 7016 m2

Matr nr. 1410d (lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 1726 m2

Matr nr. 1409 (Lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 757 m2

Økið er í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu lagt út sum C2-øki, Opin miðstaðarbygging, við hesi áseting: *"Umráðisparturin er í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhøllum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t."*

Byggistigið má ikki fara upp um 0,25 og nettonýtslustigið ikki upp um 0,3.

Býarskipanarumsitingin hevur ikki havt staðsetingarspurningin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Býarskipanarumsitingin hevur ikki viðgjørt

staðsetingina undan hesi nevndarviðgerð. Býarskipanarumsitingin ger tí vart við, at aðrar staðsetingar, har slíkt virksemi eisini kundi ligið væl saman við øðrum mentunarligum og/ella undirvísingarvirksemi, sosum Marknagil, Skálatrøð, Vestara Bryggja v.fl. ikki hava verið viðgjørdar av umsitingini. Uttan hesa viðgerð, kann býarskipanarumsitingin sostatt bert vísa til undanfarna álit um staðseting av musikkskúla, sum býráðið áður hevur viðgjørt.

Viðv. tekniska partinum er sambært byggiskránni upplýst fylgjandi:

***“Parkering og atkoma***
*Vísandi til gjøgnumstreymnin av fólki til og frá skúlanum er umráðandi, at aktoman, av- og áseting og parkeringsviðurskiftini eru nøktandi. Nýggju atkomu og parkeringsviðurskiftini verða soleiðis skipað, at hetta verður lagt yvirav innkoyring til Inn, Tórsbreyt og Kurlu. Pláss verður til uml. 40-50 bilastøðlar. Eisini er møguleiki fyri at gera parkeringshús við "grønum plássi" omaná staðsett upp ímóti ringvegnum. Gøta sambindur ferðslu hjá gangandi millum Sundsvegin og Ringvegin. Mentunarligt rekrativt øki verður skipað, hylur við tilknýti til verandi á- Hugsað er um møguleika fyri t.d. uttandura tónleikatiltøkum.*
*Nógv av- og áseting er knýtt at bygninginum, umframt at nógv trýst er í økinum frammanundan- við ferðslu til m.a. Norðurlandahúsið, Inn, Yndi, Kurlu og Tórsbreyt. Hetta skal havast í huga tá atkomuviðuskiftini vera loyst.”*

***Tekniskar veitingar***
*Bindast skal í verandi kommunalar vatn- og kloakkskipanir. Kloakk og aðrar leiðingar í jørð verður partur av skipanaruppskotinum”*

Plan- og rakstrardeildin hevur ikki havt tekniska partin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Plan- og rakstrardeildin ger tí vart við, at ætlaninar sambært byggiskránni viðv. ferðsluloysnum, parkeringstørvi, tekniskum veitingum v.m. ikki eru umrøddar við deildina frammanundan. Vísandi til nógva framførsluvirksemi, sum ætlanin er at hava í bygninginum sambært byggiskránni, og nógva framførsluvirksemi í økinum annars (Norðurlandahúsið og Kringvarpið), tekur plan- og rakstrardeildin fyrivarni fyri, at treytir verða settar í samband við byggimálsviðgerð, um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemi.

Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið til staðseting sambært byggiskránni, og at viðmæla at játta kr. 3.800.000 til projektering av kontu 5175, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at arbeitt verður víðari við fyriliggjandi uppskoti og vísir á fyrivarni fyri, at treytir verða settar í sambandi við byggimálsviðgerð um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemið. Samtykt at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 3.800.000 til projektering av konto 5175.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Ískoyti:**
Høvuðsráðgevasáttmálin:
Samráðst er við S/pf. Kontrast um sáttmála fyri høvuðsráðgeving, prosjekteringsleiðslu og serráðgeving (akustikk, bruni). Samlaða arkitektráðgevaratilboðið er kr. 2.963.419 v/mvg.

Undirráðgevingin:
Verkfrøðingaráðgevingin uppá berandi konstruktiónir, EL-prosjekt og HVS varð boðin út 10. oktober 2011 við freist at geva tilboð tann 14. oktober 2011.

Hesir fingu í boði at bjóða: P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ, P/f. HMP, Sp/f. PB Consult og Sp/f. M. Leo.

Tilboð komu inn frá Inn komu P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ og P/f. HMP. Sp/f. M. Leo ynskti ikki at bjóða. Sp/f. PB Consult hevur gjørt vart við, at teir vegna feriu ikki varnaðust útbjóðingina fyrr enn eftir svarfreistina, og hava biðið um at útseta svarfreistina.

Í útbjóðingarbrævinum varð víst á, at fylgjandi viðurskiftir verða tikin við í metingini av einstaka tilboðnum. Vektingin er líka deild yvir øll punktini:

- Samsýning fyri ráðgevingina
- Bygnaður av virki ráðgevans á hesi uppgávu
- Royndir og førleikar hjá virki og prosjektverkfrøðingi og øðrum persónum

Hesi tilboð eru komin inn:

| **Berandi konstruktiónir** | **P/f. LBF** | **P/f. HMP** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 945.355 | kr. 500.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 204.100 | kr. 200.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 1.149.455** | **kr. 700.000** |
| | | |
| Fyrivarni | Byggitíð 18 mðr. | |

| **EL** | **P/f. LBF** | **Sp/f. K.J. El-ráð** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 397.396 | kr. 396.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 115.000 | kr. 118.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 512.396** | **kr. 514.000** |

| **HVS** | **P/f. SMJ** |
|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 649.400 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 347.500 |
| **Samanlagt** | **kr. 996.900** |
| | |
| Fyrivarni | Byggitíð 12 mðr. |

Við støði í heildarmeting mæla trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til at geva umsitingini heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við:

- P/f. HMP um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi berandi konstruktiónum
- P/f. LBF um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi EL
- P/f. SMJ um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi HVS

Fígging:
Lægstu tilboðini fyri ávikavist høvuðsráðgeving og undirráðgeving eru í alt kr. kr. 5.310.796 v/mvg. Harumframt skal roknast við kr. 100.000 til innanhýsis prosjektumsiting og kr. 100.000 til útlegg og ókent.

Samlaður fíggjartørvur til prosjektering er sostatt kr. 5.515.796 v/mvg. Játtaðar eru kr. 3.800.000 til prosjektering, tvs., at tørvur er á írestandi fígging kr. 1.715.796.

**Ískoyti:**
Bygginevndin viðgjørdi málið á fundi 27. oktober 2011. Ein meiriluti í bygginevndini, Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jóan Petur Hentze og Heri Olsen, heitir á mentamálanevndina um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering vísandi til, at tilboðini fyri prosjekteringina samanlaggt eru uml. kr. 1.650.000 hægri enn játtaða upphæddin.

Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við teir í ískoytinum nevndu ráðgevarar.

Jákup Egholm Hansen boðaði frá, at hann er ikki partur av tilmælinum vísandi til, at hann í skrivi til borgarstjóran 7. oktober 2011 hevur biðið um at verða loystur úr bygginevndini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælunum hjá bygginevndini um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevarar.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2011:** Nevndin samtykti at heita á bygginevndina um sum fyrsta stig nú at útvega ummæli/loyvi frá skógfriðingarnevndini til byggiætlanina í Sortudíki at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Kommunan sendi áheitan til skógfriðingarnevndina um viðmerkingar til ætlanina at byggja musikkskúla í Sortudíki. Skógfriðingarnevndin ger í svari vart við, at talan er um óhepna gongd, um opna, grøna lendið millum Norðurlandahúsið og Sundsvegin so við og við verður umskipað til bygt øki. Skógfriðingarnevndin vísir á jaliga týdningin í býarskipanarligum høpi av at varðveita grøna geiran úr Gundadali, um Sortudíki og Ternurygg niðan í Hoydalarnar. Skógfriðingarnevndin mælir kommununi at skipa økið t.d. millum Berjabrekku, Norðara ringveg, Villingardalsvegin og Sundsvegin í serstakari byggisamtykt, áðrenn støða verður tikin til staðseting av nýggjum Musikkskúlabygningi. Skógfriðingarnevndin sendi svarið til yvirfriðingarnevndina.

Eftir samskifti við yvirfriðingarnevndina hevur kommunan sent náttúrúfriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu formliga áheitan um frávik frá § 2, stk. 2 punkt 2) í náttúrufriðingarlógini, har byggjast skal nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi. Víst varð í hesum sambandi m.a. á, at sambært góðkendu almennu byggisamtyktini er talan um C2 øki, har aðrar útbyggingar hava verið í sama øki, uttan at viðurskifti, sum hava týdning í mun til náttúrufriðingarlógina, hava verið umrødd í sambandi við hesi byggimálini. Talan er serliga um Norðurlandahúsið og Kringvarpið.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu  og Yvirfriðingarnevndin hava nú svarað áheitanini játtandi. Í gerðabók Streymoyar Sýslu Náttúrufriðingarnevnd frá fundi 25. juni 2012 stendur m.a.:

"Nevndin viðgjørdi málið og er samd um at viðmæla umsóknini og at gera frávik frá § 2, stk. 2 nr. 2. Á økinum standa frammanundan Norðurlandahúsið og Kringvarp Føroya, og eru fleiri útbyggingar gjørdar síðan ta upprunaligu byggingina av hesum bygningum.

Mett var tí, at placeringin av einum Musikkskúla á sama øki var ein natúrligur partur av ætlanini hjá Tórshavnar Kommunu, og vil Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar Sýslu tí geva sítt loyvi til nevndu bygging.

Nevndin metti heldur ikki, at henda bygging kom at gera nakað inntriv í opna grøna lendið frá Boðanesi um Hoydalar, Ternurygg og niðan til nýggja sambindingarvegin undir Vatnaskørðum, sum Skógfriðingarnevndin vil vera við. Bygningurin kemur ikki at skemma í náttúruni, tvørturímóti er hetta ein sera nútímans og snotiligur bygningur, sum kemur at prýða um í landslagnum."

Á fundi 26. juni 2012 staðfesti Yvirfriðingarnevndin avgerðina hjá Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar Sýslu við tí fyrivarni, at "... der ikke modtages anke inden ankefristens udløb den 24. juli 2012.

Mett verður, at málið og tilmælið, sum varð lagt fyri mentamálanevndina 27. oktober 2011, um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við omanfyri nevndu ráðgevarar tí kann takast upp aftur til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, vísandi til tilmæli til fund í mentamálanevndini 27. oktober 2011, at útvega írestandi fíggingina til prosjektering v.m. og játta kr. 1.715.796,- av kontu 5175 Musikkskúlin (Løgujáttan), og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevar.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**201/12** **<u>2012-1542</u>**

**<u>Sertannlæknastova í Skúlanum við Løgmannbreyt</u>**

Avtalan við Bergtóru Hanusardóttir um ortodontiviðgerðir sambært lógini um kommunala barna- og ungdómstannrøkt er uppsøgd.

Til tess at skipa eina varðandi kommunala loysn á hesum serstaka parti av virkseminum hjá Tannlæknastovuni, er ætlanin at innrætta klinikk til serviðgerðirnar í tannlæknahølunum í Skúlanum við Løgmannabreyt. Kommunan hevur harumframt sett í starv tannlækna við ortodontiútbúgving, og fer kommunan sostatt at røkja alla hesa tænastuna sjálv.

Til endamálið skal keypast nýggj útgerð. Eisini skulu ávísar hølistillagingar gerast. Talan er um 3 tannlæknastólar við allari tilhoyrandi útgerð, útbúnaði og hølum.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri útgerð og hølistillagingar er beint undir kr. 3 mió v/mvg. Tannlæknaútgerðin og útbúnaður annars er mett til kr. 1.996.237, harav kosta tannlæknastólarnir við útgerð uml. 1,7 mió. Hølistillagingarnar eru mettar til kr. 1.003.000, har størstu postarnir eru timburarbeiði og køkur, innbúgv og HSV- og EL-arbeiði.

Á íløguætlanini fyri 2012 á grein 2 eru kr. 1 mió settar av til at staðseta og byggja tannlæknamiðstøð. Ætlan hevur verið at byggja nýggja tannlæknamiðstøð bæði til vanligu barnatannrøktina og serviðgerðirnar (ortodontiina). Nú ætlanin er at innrætta sertannlæknaklinikk fyri seg, má ætlanin um tannlæknamiðstøð endurskoðast. Mett verður tí, at til ber at nýta hesa upphædd sum part av kostnaðinum at etablera sertannlæknastovuna í staðin.

Skal ætlanin setast í verk, má írestandi fígging kr. 2 mió fáast til vega. Á grein 2 er settar kr. 1 mió av til kommunalar íbúðir. Henda ætlan kann útsetast vísandi til samskiftið, sum er við Húsalánsgrunnin um at byggja luta- og leiguíbúðir. Upphæddin kann tí flytast til sertannlæknastovuna. Aðrar tøkar íløgujáttanir eru ikki á grein 2. Møguleiki er at játta kr. 1 mió av framfluttum løgukarmi kontu 4175 Dagføring av skúlum. Hetta svarar til kostnaðin av teimum tillagingum, ið gerast skulu í skúlahølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á sosialu deild og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at etablera sertannlæknastovu í tannlæknahølunum í Skúlanum við Løgmannabreyt og játta kr. 1 mió av íløgukontu 2375 Tannlæknamiðstøð, kr. 1 mió av íløgukontu 2575 Kommunalar íbúðir, og kr. 1 mió av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum.

**Sosiala nevnd 26.juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at játta 1 mió. kr. til endamálið av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**202/12** **<u>2011-0679</u>**

**<u>Uppskot til skúlabygnað</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli. Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Kunnað varð um niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021

**Ískoyti:**
Við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum umboðandi skúlastýrini, hevur annar arbeiðsbólkur nú útgreinað eitt konsept fyri nýggjum Vesturskúla (sí máltal 2012-1064). Arbeiðið er fyrsta stigið í fyrireikingunum at byggja henda skúlabygning.

Í nevndu ætlan er Vesturskúlin ein trý-sporaður skúli við forskúla og frítíðarskúla, og sostatt í samsvari við bygnaðin og skúlatilboðini, sum skotin verða upp í álitinum. Trý-sporaði Vesturskúlin er saman við ætlanini at flyta Nám X úr Eysturskúlanum høvuðsfortreyt fyri, at til ber at skipa skúlabygnaðinum fyri alla kommununa eftir uppskotinum í álitinum.

Vísandi til ætlanina at byggja Vesturskúlan (máltal 2012-1064) verður mett neyðugt við politiskari støðutakan til høvuðslinjurnar í uppskotinum til nýggja skúlabygnað fyri alla kommununa.

Hesar høvuðslinjur eru:
- At talið av sporum í høvuðsstaðarskúlunum í hádeild (7.-9. flokk) verður 14
- At Venjingarskúlin og Kommunuskúlin leggja saman í trý-sporaðan Vesturskúla
- At Skúlin á Argjahamri, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt verða tvey-sporaðir skúlar 1.-9. flokk
- At Eysturskúlin verður tvey-sporaður 1.-6. flokk og fimm-sporaður 7.-9. flokk
- At Sankta Frans skúli verður tvey-sporaður 1.-6. flokk
- At næmingar úr Sankta Frans skúla, Nólsoyar skúla, Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Kollafjarðar skúla flyta í 7. flokk í Eysturskúlan
- At Nám X flytur úr Eysturskúlanum

Uppskotið um at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum hongur ikki saman við skúlabygnaðinum, men er mál um skipan av skúlatilboðum.

Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til skúlabygnað fyri alla kommununa samsvarandi høvuðslinjunum omanfyri.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið og til kunningar í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Kunnað varð um málið

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**203/12** <u>**2012-1064**</u>

<u>**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**</u>

<u>Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur</u>
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesi nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og

møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**204/12** **2012-1064**

**Val av býráðslimi í bygginevndina til at fyrireika bygging av nýggjum skúla sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 28. juni 2012:** Valdir vórðu Jógvan Arge og Jan Christiansen.

**205/12** **2011-2948**

**Umsókn frá Eigarafeløgunum á Berjabrekku**

Eigarafeløgini á Berjabrekku heita á kommununa um at samtykkja í veðseting fyri láni stórum kr. 550.000,00 í Eik banka við veð í hitamiðstøðini á Berjabrekku.

Hitamiðstøðin hevur fingið játtað eitt lán í Eik banka uppá kr. 550.000,00 ímóti 1. veðrætti kr. 600.000,00 í bygninginum Hitamiðstøðin á Berjabrekku.

Trupulleikin er, at Tórshavnar kommuna er tinglýstur eigari av matr. nr. 1464b, sum hitamiðstøðin er bygd á.

Vísandi til at eingin leigusáttmáli er millum kommununa og eigarafeløgini á Berjabrekku (Hitamiðstøðina), ber ikki til hjá Eigarafeløgunum at veðseta hitamiðstøðina fyri láninum í Eik banka.

**Yvirlit yvir matriklini á Berjabrekku:**
Matr. nr. 1464b. Hitamiðstøðin. Vídd uml. 590 m² við ástandandi hitamiðstøð uml. 70 m².
Matr. nr. 1464c. Berjabrekka 1. Vídd 13.085 m². 71 íbúðir eru frámatrikuleraðar.
Matr. nr. 1464d. Berjabrekka 2. Vídd 6.310 m². 32 íbúðir eru frámatrikuleraðar.

**Ymiskt:**
Sambært § 15 í viðtøkunum fyri Eigarafelagið á Berjabrekku framgongur, at hitamiðstøðin er felags ogn, og er raksturin av henni fyri felags rokning. Hvør einstakur eigari rindar aconto eitt av nevndini ásett gjald, smb. § 13.

Eigarafelagið hevur øll árini, síðani íbúðirnar vóru bygdar í 80unum, arbeitt sum um hitamiðstøðin er eigarafelagsins ogn, og hevur eigarafelagið havt viðlíkahaldið av hitamiðstøðini.

Talan er um gamalt mál frá 1980unum, men sambært samrøðu við Ronald Poulsen, sum hevði eftirlitið um hendi fyri kommununa, var hitamiðstøðin partur av verkætlanini, og tískil er hon eisini goldin av íbúgvunum.

Umsitingin hevur skjøl, sum undirbyggja, at Hitamiðstøðin var partur av byggirokniskapinum.

**Tilmæli:**
Vísandi til:

- at Hitamiðstøðin sambært viðtøkunum er felagsogn hjá íbúgvunum á Berjabrekku.
- at Eigarafelagið hevur havt rakstur og viðlíkahaldið av hitamiðstøðini um hendi, síðani hitamiðstøðin varð bygd í 1980unum
- at Eigarafelagið øll árini hevur arbeitt, sum um hitamiðstøðin var ogn hjá íbúgvunum á Berjabrekku,

Mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til at skriva leigusáttmála við íbúgvarnar á Berjabrekku/Eigarafelagið á Berjabrekku um leigu av undirlendinum undir hitamiðstøðini.

Leigusáttmálin er treytaður av góðkenning frá Innlendismálaráðnum og av, at Eigarafelagið kann góðtaka treytirnar í sáttmálanum.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**206/12** **2012-0681/6 SG**

**Útstykking Kaldbak - Sølustøða.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykkingin í Kaldbak umfatar í alt 10 sethúsagrundstykkir. Fermeturprísurin er kr. 793,51.

Grundøkini eru matrikuleraði fyri góðum 2,5 árum síðani, men eru enn bert 4. stykkir seld.

Ein av eigarunum ynskir at lata stykkið innaftur, og er í løtuni bert ein møguligur áhugaður keypari til eitt av stykkjunum.

Í sølutilgongdini hevur tað eisini víst seg, at áhugi var at keypa tey 4 uttastu stykkini ( tey sum liggja móti bygdini ) tí her var minni jarðarmunur.

Útstykkingin er annars sera trupul, tí talan er um sera stóran jarðarmun, og er tí talan um dýra og tekniskt trupla byggibúning, samstundis sum fermeturprísurin er høgur.

Jarðarmunurin verður størri longur inni, og er byggibúningarkostnaðurin tískil hægri, longur  inni móti kaldbaksfirði.

Ein møgulig loysn kundi tí veri at kommunan átók sær at gera grundøkini byggibúgvin.

Trupulleikin er tó at stykkini tá vildu gjørst enn dýrari.

Ein kanning av møguligum byggibúningarkostaði eigur at vera umhugsað.

Annar møguleiki er at lýsa stykkini til sølu, til marknaðarprís. Í hesum føri verður marknaðarprísurin mettur at vera lægri enn kostprísur.
Kommunan kann í eini sølutilgongd áseta ein mettan minstaprís.

**Dømi:**
Um kommunan selir stykkini fyri kr. 550 fermeturin ( sum kann vera minstiprísur )

| | |
|---|---|
| Talan er um í alt. 5.164 fermetrar á kr. 793,51 = | kr.  4.097.685,64 |
| Harav eru seldir  1.590 fermetrar á kr. 793,51 = | kr.  1.633.043,58 |
| =  útlegg | kr.  2.464.642,06 |

Um øll stykkini verða seld fyri kr. 550,00 fermeturin, fær útstykkingin eitt hall á kr. 1.257.486,64  ( Herav endurgjald til teir 4. verandi eigarararnar í alt kr. 501.143,58 )

Um teir 4. eigararnir verða hildnir uttan fyri verður hallið kr. 756.343,06

Um stykkini vera seld í fríðari sølu, verður mett at stykkini fáa ymiskan prís, samstundis sum onkur stykki framvegis ikki verða seld.

Umsitingin er í iva um hvat gerast skal. Vanligt er at selja stykkini í eini skipaðari útstykking til kostprís, og til teir møguligu keyparar sum standa á bíðilista til sethúsagrundøki.

Í hesum føri hevur tað ikki eydnast at selja stykkini eftir bíðilista, og heldur ikki nú stykkini hava ligið í fríðari sølu til fastan prís.

Tað er okkara metan at stykkini eru ov dýr, samstundis sum tey eru trupul og dýr at gera byggibúgvin

Trupult er at áseta marknaðarprísin sum væntandi eisini í hesum føri kann gerast lægri enn uppstillaðu kr. 550 pr. fermeturin.

Um kommunan velur at selja stykkini til marknaðarprís, er spurningurin eisini um kommunan er moralskt bundin fyri teimum keyparum sum frammanundan longu hava ognað sær eitt stykki til kostprís.

Løgdeildin metir ikki at kommunan er juridiskt bundin at gomlu keyparunum, tí talan er um endaligan handil, har keyparin til tá kendar fortreytir keypir eitt grundøki til ásettan prís.

**Tilmæli.**
Leiðarin í starvsfólka og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at fíggjarnevndin umrøður málið.

Skal kommunan

1. Lýsa stykkini til sølu í fríðari sølu til marknaðarprís.
2. Kanna møguligan byggibúningarkostnað.
3. Gera byggibúning lidnað og selja til kostprís.
4. Gera byggibúning lidnað og selja til marknaðarprís
5. Um stykkini verða seld til marknaðarprís. Vil kommunan tá endurrinda verandi eigarum ein møguligan mun millum kostprís og marknaðarprís. Og hóast mett verður at kommunan ikki er juridiskt bundin at einum endurgjaldi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyristingarstjórin mæla til at lýsa tey óseldu stykkini í fríðari sølu til marknaðarprís.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til, at grundøkini hava verið boðin til sølu á bíðilistanum hjá kommununi, men at áhugi ikki er til staðar at ogna sær grundøkið, verður mælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum og lýsa grundøkini til sølu í fríari sølu, og verða tey seld, um hóskandi boð fæst.

**Býráðið 2. mai 2012:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**Ískoyti.**
Inni hevur fingið uppgávuna at selja grundøkini í Kaldbak. tó við fyrivarni um, at býráðið skal góðkenna søluna av hvørjum einstøkum grundøki.

Eigararnir av tveimum óbygdum grundøkjum hava gjørt vart við, at samtyktin í býráðnum um at selja grundøkini í fríðari sølu hevur ta fylgju, at teirra grundøki fáa lægri virði.

**Matr. nr. 22aa, Kaldbak. Eigari, Rúni Hvannastein**. Vídd á grundøki 520 m². Keypsprísur. kr. 412.625,20

Rúni hevur fyri góðum ári síðani heitt á kommununa um at taka stykkið inn aftur fyri keypsprís. Kommunan hevur havt stykkið á sølulista, men er stykkið framvegis ikki selt.

Síðani hevur kommunan samtykt at selja stykkini í fríari sølu, og eru møguleikarnir fyri at kunna selja hansara stykki fyri upprunaprís lítlir og ongir. Rúni vísir á, at samtyktin ger hansara støðu verri, tí ongin fer at keypa hansara stykki fyri kostprís, um hini óbygdu stykkini verða seld fyri lægri prís.

**Matr. nr. 22t, Kaldbak. Eigari, Petur Nolsøe.** Vídd á grundøki 525 m². Keypsprísur kr. 416.592,75

Petur hevur fyri stuttum keypt stykkið. Hann hevur gjørt sáttmála við Norðsetur, og hevur eisini fingið byggiloyvi.

Talan er um eina trupla útstykking. Grundøkini eru dýr, og er talan um dýra byggibúning, tí útstykkingin liggur í lendi við stórum hæddarmuni.

Um kommunan samtykkir at taka stykkini inn aftur, hava omanfyri nevndu eigarar saman við øðrum áhugaðum møguligum keyparum møguleika til at keypa egin stykki aftur.

**Tilmæli:**
Vísandi til at talan er um eina trupla og dýra útstykking, mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til at keypa óbygdu stykkini aftur fyri kostprís.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |